FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Argir**, 18. januar 2013

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. xx/2012: Uppskot til løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (Eftirlønarlógin)**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn (Eftirlønarlógin)**

## Kapittul 1

*Vavið*

**§ 1.** Persónur, sum hevur fylt 21 ár, men ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur, og sum hevur fulla skattskyldu til Føroyar, hevur skyldu til at spara saman til egna eftirløn sambært hesi løgtingslóg.

*Stk. 2.* Persónur, sum í sínum setanarviðurskiftum vinnur tænastumannaeftirlønarrætt, er ikki fevndur av hesi løgtingslóg við atliti at tí løn, hann vinnur sambært tænastumannastarvinum.

*Stk. 3.* Lesandi uttanlands, sum hevur varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar, hevur ikki skyldu til at spara saman til egna eftirløn eftir hesi løgtingslóg við atliti at inntøku, ið er forvunnin uttanlands.

*Stk. 4.* Persónur, ið fær eftirlønarútgjald sambært hesi løgtingslóg skal ikki framhaldandi spara saman til egna eftirløn av løn, ið hann forvinnur.

*Stk. 5.* Persónur, ið flytir til Føroya í styttri lívstíðarskeið enn 60 mánaðir í tíðaravmarkað starv, kann søkja TAKS um at vera frítikin fyri at rinda til eina føroyska eftirlønarskipan sambært hesi løgtingslóg. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

*Stk 6.* Persónur, ið er yngri enn 21 ár, kann rinda til eftirløn sambært hesari løgtinglóg.

*Stk 7.* Persónur, ið fær fólkapensjón, kan ikki rinda til eftirløn sambært hesari løgtingslóg.

*Stk. 8.* Persónur, ið er fevndur av hesari løgtingslóg, og sum ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan, hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu í sambandi við starvsetan, ella í sambandi við, at hann móttekur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av.

*Stk. 9.* Persónur, ið er fevndur av eftirlønarskipan uttanlands sum part av arbeiðssáttmála við arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, og har arbeiðið verður útint uttan fyri Føroyar, kann verða undantikin at rinda til eftirløn sambært hesari løgtingslóg við atliti at inntøku, ið er forvunnin uttanlands. Umsókn skal sendast til TAKS, ið metir, hvørt talan er um eftirlønarskipan, sum í nóg stóran mun tryggjar samansparara eitt nøktandi inntøkugrundarlag eftir pensjónsaldur. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

## Kapittul 2

*Eftirlønargjaldið*

**§ 2.** Bundna eftirlønargjaldið er frá 1. januar 2014 í minsta lagi 1 prosent av A og B-inntøkuni, og eftirlønargjaldið hækkar 1 prosentstig árliga sambært talvuni niðanfyri til 15 prosent í 2028 og seinni. Er eftirlønargjaldið ásett í starvssáttmála, er prosentparturin í starvssáttmálanum galdandi í tann mun, hann er hægri enn ásett í hesari lóg.

| | ***Eftirlønargjald*** |
|---|---|
| Frá 1. jan. 2014 | 1 prosent |
| Frá 1. jan. 2015 | 2 prosent |
| Frá 1. jan. 2016 | 3 prosent |
| Frá 1. jan. 2017 | 4 prosent |
| Frá 1. jan. 2018 | 5 prosent |
| Frá 1. jan. 2019 | 6 prosent |
| Frá 1. jan. 2020 | 7 prosent |
| Frá 1. jan. 2021 | 8 prosent |
| Frá 1. jan. 2022 | 9 prosent |
| Frá 1. jan. 2023 | 10 prosent |
| Frá 1. jan. 2024 | 11 prosent |
| Frá 1. jan. 2025 | 12 prosent |
| Frá 1. jan. 2026 | 13 prosent |
| Frá 1. jan. 2027 | 14 prosent |
| Frá 1. jan. 2028 | 15 prosent |

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin hevur við teimum avmarkingum, sum eru nevndar í § 1, stk. 2, 3, 4, 5 og 7 og § 3, skyldu at flyta eftirlønargjaldið hjá løntakara. Eftirlønargjaldið skal rindast umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS, samstundis sum lønin verður flutt, og í samsvari við eftirlønaravtaluna.

*Stk. 3.* Eftirlønarsamansparari kann sjálvboðin rinda meira enn tað í stk. 1 nevnda prosentgjald.

*Stk. 4.* Uttan mun til prosentásetingina í stk. 1, hevur eingin skyldu til at gjalda meira enn 150.000 krónur árliga í eftirlønargjaldi brutto. Upphædd oman fyri 150.000 krónur kann verða goldin útaftur av eftirlønarveitara, tá TAKS hevur játtað umsókn um útgjalding hjá eftirlønarsamansparara, ið eftirlønarveitari avgreiðir. Umsóknin skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 1. juni árið eftir inngjaldsárið.

*Stk. 5.* Persónur við B-inntøku skal gjalda eftirlønargjald sambært stk. 1. Eftirlønargjaldið skal rindast umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS, annaðhvørt beinleiðis ella umvegis eftirlønarveitara.

*Stk. 6.* Rindan av eftirlønargjaldi fyri B-inntøkur verður roknað at vera rættstundis, tá goldið verður í seinasta lagi 1. mai árið eftir inntøkuárið.

*Stk. 7.* Um eftirlønarsamansparari sambært stk. 5, ikki heldur sína skyldu við at rinda eftirlønarinngjaldið sambært stk. 1, kann tann skuldkomna eftirlønin verða framd við panting eftir reglunum í § 135 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

*Stk. 8.* Av tí í stk. 1 ásetta eftirlønargjaldi kann í mesta lagi ein triðingur fara til trygging í sambandi við óarbeiðsføri og deyða, meðan restin skal fara til eftirlønarsamanspöring.

**§ 3.** Tað í § 2, stk. 1 ásetta prosentgjaldið verður ikki rindað av niðanfyri nevndu peningaupphæddum:

1. Uppihaldspeningur sambært hjúnabandslóggávuni.
2. Barnagjald og barnaískoyti sbrt. lóg um einsamallar uppihaldarar.
3. Fólkapensjón
4. Lutaeftirløn.
5. Lívrenta o.a.
6. Fyritíðarpensjón og útgjald frá vardum verkstað.

7. Avlamisveiting, avlamisviðbót, persónlig viðbót, barnaviðbót, røktar- og hjálparviðbót sbrt. lóg um almannapensjónir.
8. Allar tryggingarveitingar, øll útgjøld sambært tænastumannalógini og líknandi.
9. Stak og brekbøtandi veitingar umframt barnaviðbót sbrt. forsorgarlógini.
10. Útbúgvingarstuðul.
11. Vinningur av eydnuspæli, legati, sømdargávum o. l.
12. Útgjald frá Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunninum.
13. Viðbót til ávísar pensjónistar.
14. Ættleiðingarstuðul.
15. Stuðul til uppihaldspening.
16. Gjald fyri uppihald og lummapening sbrt. lóg um barnavernd.

**§ 4.** Eftirlønarsamansparararin eigur persónliga sína samansparing, ið er undandrigin ræði hjá eftirlønarsamansparara, og er vard fyri úttøku ella aðrari rættarsókn frá ognarum. Eftirlønarsamansparingin kann ikki avhendast, veðsetast ella verða nýtt sum mótrokning fyri møguligum kravi frá eftirlønarveitara.
*Stk. 2.* Eftirløn kann ikki verða fyri rættarsókn, fyrr enn hon er útgoldin.
*Stk. 3.* Henda løgtingslóg forðar ikki fyri, at eftirlønarsamansparing, ið er inngoldin eftir 1. januar 2014, kann gerast partur av felags búnum, sum í sambandi við hjúnaskilnað verður býtt og flutt millum eftirlønarsamansparingar og eftirlønarveitararnar hjá hjúnafeløgunum, uttan at avgjald verður rindað til landskassan.

## Kapittul 3

*Eftirlønarveitarar*

**§ 5.** Inngjald sambært hesi løgtingslóg kann einans fara til góðkendan eftirlønarveitara, ið hevur heimstað í Føroyum. Eftirlønarveitarar skulu fráboða TAKS tær eftirlønarskipanir, ið teir veita eftirlønarsamanspararum.
*Stk. 2.* Eftirlønarsamansparing skal stovnast í lívstryggingarfelagi, eftirlønargrunni ella peningastovni, ið váttar at fylgja ásetingum sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 3.* Umsitingar- og avgreiðslugjøld av eftirlønarskipan skulu vera gjøgnumskygd. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.
*Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari kann ikki, sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara, verða álagdur einans at kunna rinda eftirløn til ein ávísan eftirlønarveitara. Kunnu aðrir eftirlønarveitarar enn teir, sum fakfelag eftirlønarveitarans hevur sáttmála við, veita tær tænastur, sum sáttmálin ásetir, skal tað verða møguligt hjá eftirlønarsamansparara at skifta eftirlønarveitara.

**§ 6.** Eftirlønarveitarar skulu senda árliga teldutøka kunning til TAKS um upplýsingar hjá øllum teimum, ið eru skrásett í eftirlønarskipanini hjá eftirlønarveitaranum. Kunningin skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 20. januar eftir inntøkuárið ella fyrsta gerandisdag eftir 20. januar. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð, hvørjar upplýsingar skulu sendast til TAKS, og hvussu hesar upplýsingar skulu latast TAKS.

*Íløgureglur fyri peningastovns-eftirlønarveitarar*

**§ 7.** Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, skulu vera á serligum eftirlønarinnlánskontum, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum.
*Stk. 2.* Í eftirlønarhøpi í sambandi við virðisbrævahandil skal eftirlønarsamansparararin í peningastovni fylgja "bekendtgørelse for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel".
*Stk. 3.* Uppspard eftirløn skal støðlast sambært reglunum í "bekendtgørelse om puljepension og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v". Eftirlønarveitarin fremur virðisbrævahandilin vegna eftirlønarsamansparararan.
*Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari í peningastovni kann einans hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv har partabrævaparturin fylgir talvuni niðanfyri.

| Aldur í ár | Partabrævapartur í mesta lagi |
|---|---|
| - 34 | 80 prosent |
| 35 - 44 | 70 prosent |
| 45 - 49 | 60 prosent |
| 50 - 59 | 50 prosent |
| 60 - 64 | 40 prosent |
| 65 - 69 | 30 prosent |
| 70 - | 15 prosent |

*Stk. 5.* Tá partabrævaparturin hjá einum persóni er oman fyri hámarkið, sum er ásett í talvuni í stk. 1, verður rebalanserað.
*Stk. 6.* Persónur, yngri enn 60 ár, verður ikki álagdur at selja av partabrævagoymslu, hóast virðið av partabrævapartinum er oman fyri tað hægst loyvda. Rebalanserað verður soleiðis, at íløgur bert kunnu verða gjørdar í lánsbrøv, inntil partabrævaparturin er komin niður á hægst loyvda markið fyri partabrævapartin sambært stk. 1.
*Stk. 7.* Hjá persóni, ið er 60 ár ella eldri, skal íløgurøðin rebalanserast niður á hægst loyvda partabrævapart í seinasta lagi fyrsta handilsdag eftir, at persónurin er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár, sum ásett í talvuni í stk. 1.
*Stk. 8.* Virðisbrævagoymslan verður gjørd upp til marknaðarvirðið í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari ynskir at byrja útgjald, og í fyrsta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari nær pensjónsaldri, og í seinasta lagi 2 mánaðir fyri, at eftirlønarsamansparari fær fólkapensjón.
*Stk. 9.* Tað er skylda hjá eftirlønarveitara at tryggja, at ásetingarnar í hesi grein verða fylgdar.

*Íløgureglur fyri eftirlønargrunnar og fyri lívstryggingarfeløg í lívstrygginarflokki III*

**§ 8.** Eftirlønargrunnar og tryggingarfeløg í lívstryggingarflokki III kunnu gera íløgur vegna eftirlønarsamanspararar sambært reglum í lóg um tryggingarvirksemi.
*Stk. 2.* Tryggingar, ið verða gjørdar sambært hesi løgtingslóg og teknaðar undir lívstryggingarflokki III í lívstryggingarfelagi og eftirlønargrunni, skulu vera settar saman soleiðis, at fíggjarligi váðin er hóskandi og gagnligur fyri eftirlønarsamanspararan. Tá mett verður um váðin er hóskandi skal atlit takast til aldur, heilsu, fíggjarstøðu og onnur viðkomandi viðurskiftir.
*Stk. 3.* Landsstyrismaður kann í kunngerð áseta íløgureglur fyri eftirlønargrunnar og tryggingar undir Lívstryggingarflokki III og aðrar tryggingar inngoldnar eftir hesi lóg.

## Kapittul 4

*Útgjaldshættir*

**§ 9.** Eftirlønarútgjald kann, við undantak av stk. 5, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldur, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virði, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum lutaeftirløn, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu.
*Stk. 2.* Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Boðast skal frá í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn útgjald byrjar. Í fráboðanini til TAKS verður ásett, hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast.

Býtið skal, undantikið stk. 5 og § 10. stk. 2, uppfylla hesar treytir:

1) í minsta lagi 45 % sum lívlong veiting.
2) í mesta lagi 55 % sum lutaeftirløn.
3) í mesta lagi 15 % sum kapitalútgjald.

<u>Lívslong veiting</u> (lívrenta) er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin leypandi, so leingi tann tryggjaði persónurin er á lívi, og fellur síðan burtur, tá ið hann doyr.
<u>Lutaeftirløn</u> er eftirlønarskipan, ið verður útgoldin í eins stórum lutum yvir eitt ásett tíðarskeið. Tíðarskeiðið skal verða í minsta lagi 10 ár.
<u>Kapitalútgjald</u> er upphædd, sum verður útgoldin í einum.
*Stk. 3.* Frá valda útgjaldsdegi sambært stk. 2 er valið bindandi, tó kann parturin, sum fer til lívlanga veiting økjast, og tað er TAKS, ið gevur loyvi eftir skrivligari áheitan frá

eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara.

*Stk. 4.* Lívlanga veitingin, kann ongantíð verða kravd at vera hægri enn 40 prosent av eini arbeiðaraløn sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Upphædd, ið er oman fyri ta kravdu lívlongu veitingina, kann flytast til lutaeftirlønarsamansparingina.

*Stk. 5.* Fyri eftirlønarsamansparara, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at hann, grundað á sjúku, hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, ber til at byrja eftirlønarútgjald, áðrenn eftirlønarsamansparain nær fólkapensjónsaldur, sum er ásett í stk. 1. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur játtað umsókn. Upphædd, ið skuldi verið brúkt til lívrentu, kann ístaðin verða brúkt til lutaeftirløn, um ikki onnur avtala er gjørd. 15 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald og restin sum lutaeftirløn. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

*Stk. 6.* Eftirløn kann í seinasta lagi fara í útgjald sama dag, sum eftirlønarsamansparari fær fólkapensjón. Kapitalútgjald, útgjald av lutaeftirløn og útgjald av lívlangari veiting byrja samstundis.

*Stk. 7.* Útgjald sambært hesi løgtingslóg verður framd gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS.

**§ 10.** Eru eftirlønarsamansparingar hjá fleiri eftirlønarveitarum, kann eftirlønarsamansparari geva einum ávísum eftirlønarveitara heimild til at savna saman samlaðu virðini frá øllum eftirlønarveitarunum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri mannagongd og kostnaði.

*Stk. 2.* Er samlaða eftirlønarsamansparingin, hjá øllum føroyskum eftirlønarveitarum tilsamans, minni enn 300.000 krónur við eftirlønaraldur sambært § 9, stk. 2, kunnu í staðin 50.000 krónur rindast út sum kapitalútgjald, og restin verða útgoldið við 4.000 krónum um mánaðin.

*Útgjald við deyða*

**§ 11**. Í samansparingartíðarskeiðnum er eftirlønin at meta sum lutaeftirløn, um ikki onnur avtala er galdandi. Tá eftirlønarsamansparari doyr, fellur samansparda eftirlønarupphæddin til njótunartilskilaða sambært eftirlønarsáttmálanum, um ikki onnur avtala er galdandi.

*Stk. 2.* Um njótunartilskilaði er hjúnafelagi ella sambúgvandi, tó ikki barn, kann hann velja at fáa alla ella part av eftirlønarsamansparingini flutta skatta- og avgjaldsfrítt til sína egnu eftirlønarsamansparing, og verður tann samanlagda eftirlønarsamansparingin fevnd av ásetingunum í hesi løgtingslóg.

*Stk.3.* Hevur eftirlønarsamansparain eingi nærmastu avvarðandi, og er eingin njótunartilskilaður innsettur, verður eftirlønarupphæddin umløgd til eitt kapitalútgjald og verður síðan partur av búnum.

*Stk. 4.* Skiftirætturin sendir skjøl til góðkenningar hjá TAKS vísandi til hesa grein.

## Kapittul 5

*Inngjald, frádráttur og skattur*

**§ 12**. Inngjøld til eftirlønarskipan verða goldin á eftirlønarkonto sambært eftirlønarsáttmála.

*Stk. 2.* Rindast skulu 40 prosent í eftirlønarskatti til landskassan av inngoldnum eftirlønargjaldi.

*Stk. 3.* Tað er frádráttarrættur í skattskyldugu inntøkuni fyri inngjøld eftir hesi løgtingslóg. Sami skattligi frádráttarrættur er fyri sjálvboðið inngjald sambært § 2, stk. 3, og fyri inngjald sambært § 1, stk. 6 og § 2, stk. 5 og § 17, stk 1 og 5.

*Stk. 4.* Frádrátturin í skattskyldugu inntøkuni fylgir inntøkuárinum, har inngjaldið er farið fram.

*Stk. 5.* Hall kann verða flutt fram til frádrátt eitt seinni inntøkuár í tann mun, rúm ikki er fyri tí í skattskyldugu inntøkuni eitt fyrri ár.

*Stk. 6.* Tá persónur, ið hevur verið undir avmarkaðari skattskyldu til Føroya, kemur undir fulla skattskyldu til Føroya, verður eftirlønargjaldskylda at rokna frá tí degi, avmarkaða skattskyldan heldur uppat.

*Stk. 7.* Um arbeiðsgevari ikki flytur skattin av eftirlønini rættstundis, kann TAKS krevja upphæddina við tilskrivaðum rentum inn við panting eftir reglunum í § 135 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
*Stk. 8.* Um eftirlønarsamansparari ikki heldur sína skyldu við at rinda skatt sambært stk. 2, verður tann skuldkomni skatturin kravdur inn við eftirlønarskattauppgerð eins og B-skattur. TAKS kann fremja panting eftir reglunum í § 135 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
*Stk. 9.* Hvussu eftirløn og eftirlønarskattur verður rindaður, verður nærri ásett við kunngerð.

**§ 13.** Rentur og annar vinningur í eini eftirlønarskipan eru hvørki skatta- ella avgjaldsskyldug.
*Stk. 2.* Tað sama er galdandi fyri vinning og tap við innloysing ella sølu av partabrøvum, sølu av tekningarrætti, vinningi og tapi vegna kursbroytingar av lánsbrævagoymslu, útlutan av avtøkuvinningi ella líknandi, tá virðisbrøvini eru partur av eini eftirlønarsamansparing.
*Stk. 3.* Í sambandi við útgjald verður rentutilskriving, uppspart bonus og annar vinningur sambært stk. 1 og 2 roknað upp í samlaðu útgjaldsupphæddina og rindað avgjalds- og skattafrítt útaftur. Sama er galdandi fyri tryggingarútgjald.

*Inngjald uttan frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni*

**§ 14.** Inngjøld til eftirlønarskipanir, sum ikki koma undir treytirnar í hesi løgtingslóg, hava ikki frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni.
*Stk. 2.* Útgjald sambært stk. 1 verða ikki skattað, tó skal rentutilvøkstur og virðisøking viðgerast eftir kapitalvinningsskattalógini í samansparingartíðarskeiðnum og verða skattað árliga. Tað er eftirlønarveitari, ið flytir skattin beinleiðis til TAKS vegna eftirlønarsamansparara.

## Kapittul 6
## Ymiskar ásetingar

*Javning av upphæddum*

**§ 15.** Upphæddirnar, sum eru ásettar í § 2, stk. 4, § 10, stk. 2 í hesi løgtingslóg verða árliga javnaðar í mun til prístalið 1. juli 2013, sum verður sett til 100. Broytingin í upphæddunum verður útroknað hvønn 1. Juli, og saman við upphædd sambært § 9, stk. 4, kunngjørd av landsstýrismanninum sum galdandi fyri komandi álmanakkaár.

*Ásetingar um revsing*

**§ 16.** TAKS hevur heimild at áleggja bøtur. Verður ásetingin í § 6 ikki fylgd, verða dagbøtur upp á 50.000 kr. álagdar fyri hvønn dag, ið fer út um fyrsta gerandisdag eftir 20. januar.
*Stk. 2.* Heldur eftirlønarveitari ikki ásetingarnar í §§ 5, 6, 7, 8, og § 9, stk. 2, sendir TAKS í fyrsta lagi eina ávaring. Um brotið ikki verður rættað, kann eftirlønarupphæddin verða flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønareigaran.
*Stk. 3.* Um eftirlønarveitari áhaldandi ikki fylgir áseting í hesi løgtingslóg, kann TAKS áleggja dagbót upptil 20.000 krónur, til viðurskiftini eru komin í rættlag. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

## Kapittul 7
## Skiftisásetingar

**§ 17.** Persónur, ið er føddur fyri 1. januar 1954, hevur ikki skyldu til at spara saman til egna eftirløn eftir § 1, stk. 1, men kann sjálvboðin spara saman til eftirløn sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Freistin at stovna eftirlønarsáttmála er sett til 31. desember 2014 fyri tann, ið ongan eftirlønarsáttmála hevur, men er fevndur av lógini og hevur inntøku, ið eftirlønargjald skal rindast av.
*Stk. 3.* Eftirlønarsamansparing, ið er inngoldin í 2012 ella 2013, kann gerast partur av eftirlønarsamansparing, ið er inngoldin frá 1. januar 2014.

*Stk. 4.* Talan verður ikki um nýtekning av galdandi eftirlønaravtalum, ið gjørdar eru millum føroyskan eftirlønarveitara og hvønn einstakan tryggingartakara. Tær tryggingar, ið eru stovnaðar sambært eftirlønaravtalu, eru framvegis í gildi.

*Stk. 5.* Persónur, sum í starvi sínum fyri arbeiðsgevara við heimstað í Føroyum, er fevndur av eftirlønarskipan hjá donskum eftirlønarveitara, tá henda lóg kemur í gildi, kann verða undantikin hesi løgtingslóg, og í staðin halda áfram við at rinda til donsku eftirlønarskipanina hóast ásetingarnar í § 5. Treytir fyri undantøku eru, at onki verður rinda til kapitaleftirløn, og at rindað verður í minsta lagi 15 prosent av føstu árslønini. Fyri inngjaldi verður veittur burtursíggingarrættur ella frádráttur í skattskyldugu inntøkuni og rindað verður 40 prosent í eftirlønarskatti samsvarandi § 12, stk. 2. Útgjaldsleisturin fylgir áseting, ið er galdandi sambært eftirlønarsáttmálanum. Loyvi verður givið eftir umsókn til TAKS. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

**§ 18.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2014.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn, nevnd eftirlønarlógin, verður við hesum løgd fyri Løgtingið.

Skotið verður upp at seta í verk eina bundna eftirlønarsamansparing fyri allar borgarar við tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Talan er um nýggja lóggávu á økinum.

Nýggjar reglur verða gjørdar um inngjald og útgjald av eftirlønarsamansparing. Hetta eru reglur, sum í dag eru ásettar í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. (Rentutryggingarlógin), men frameftir fara at verða ásettar í nýggju eftirlønarlógini við ávísum broytingum.

Tá samansparingin til eftirløn veksur, gerst eftirlønin sum frálíður so mikið stór, at stórum parti av fólkinum fer ikki at tørva fulla fólkapensjón. At fólkapensjónsútreiðslurnar lutfalsliga fara at minka hevur við sær, at tað almenna frameftir verður betri føRt fyri at røkja vælferðartænastur til eldri sum t.d. heimarøkt, ellisheim og sjúkrarøkt.

Gjørt verður tó vart við, at hetta lógaruppskotið einsamalt ikki hevur nakra sparing við sær í almannapensjónum. Orsøkin er tann, at verandi lóggava ikki gevur møguleika fyri at mótrokna útgjøld eftir hesari lóg í almannapensjónum (sama ger seg galdandi fyri útgjøld sambært verandi rentutryggingarlóg, sum eru inngoldin eftir 1. januar 2012). Í hesum sambandi verður neyðugt at broyta reglurnar um mótrokning o.a. Hetta arbeiði er í gongd, og er ein partur av seinna liði í pensjónsnýskipanini, har hetta uppskotið er at meta sum fyrri liður.

Umframt mótrokning verður eisini arbeitt við einum nýggjum uppskotið til, hvussu almannapensjónir skulu verða samansettar frá 2014 og frameftir, og hvussu tær skulu javnast frameftir. Hesi uppskot, sum eru seinni liður í pensjónsnýskipanini, er ætlanin at leggja fyri løgtingi í heyst.

Um eftirlønarsamansparingin skal vera til gagns fyri einstaklingin og fyri samfelagið, skal samansparingin tryggja, at fólk í størri mun fíggjarliga klára at forsyrgja sær sjálvum, tá tey gerast pensjónistar. Tí er neyðugt, at eftirlønarsamansparing verður gjørd við leypandi útgjaldingum og ikki sum kapitaleftirlønarútgjøld í einum. Eisini er neyðugt, at eftirlønin í fyrsta lagi kemur til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum. Við verandi lóggávu, er møguligt at taka eftirlønina út við 60 ára aldur. Hetta tryggjar ikki, at persónurin hevur nóg mikið eftir at liva av, tá persónurin verður pensjónistur.

Mælt verður til, at eftirlønarsamansparing verður gjørd samsvarandi hesum leisti:

- Í minsta lagi 15 prosent av øllum A- og B-inntøkum skal gjaldast til eftirløn.
- Eftirlønin skal útgjaldast sum:
    - í minsta lagi 45 prosent lívlong veiting
    - í mesta lagi 55 prosent lutaeftirløn.
    - Í mesta lagi 15 sum kapitalútgjald.
- Eftirlønarsamansparing kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar, tá ið samanspararin nær fólkapensjónsaldur og í seinasta lagi, tá ið samanspararin fær fólkapensjón.

*Eftirlønarsamansparing í Føroyum í dag*
Hóast nógvir løntakarar í dag rinda til eftirlønarsamansparing, eru tað langt frá øll, ið rinda, og fleiri rinda ov lítið munagóða eftirlønarsamansparing samanborið við onnur lond.

Nærum allir løntakarar hjá tí almenna rinda til eftirlønarskipan, ið sáttmálapartarnir á arbeiðsmarknaðinum, t.e. arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg, hava avtalað seg fram til við lønarsamráðingum gjøgnum mong ár.

Stórur partur av løntakarunum á privata arbeiðsmarknaðinum rinda eftirløn sambært kollektivum sáttmálum. Kortini eru ikki øll fevnd av kollektivum sáttmálum, og eru tað serliga sjálvstøðug vinnurekandi, ið ikki gjalda til eftirløn.

Í fleiri pørtum av privata arbeiðsmarknaðinum rindar arbeiðsgevari eftirløn, ið verður útgoldin saman við lønini. Síðan stendur tað til starvsfólkið sjálvt, um tey rinda til eftirløn ella ikki. Ásannast má, at nógv av teimum, ið hava slíkt frælsi, velja eftirlønargjald frá, og hava tí størri tøka inntøku, enn tey, ið rinda eftirløn.

Mett verður, at uppskotið fer at hava við sær, at samlaða árliga eftirlønaruppsparingin í Føroyum fer at tvífaldast í mun til í dag. Í dag verða rindaðar umleið 550 mió. kr. árliga til eftirlønarskipanir.

**Rentutryggingarlógin**
Rentutryggingarlógin, ið kom í gildi í 1971, hevði gomlu donsku “renteforsikringsloven” frá 1958 sum fyrimynd. Sama ár, sum føroyingar settu rentutryggingarlógina í gildi, settu danir sína rentutryggingarlóg úr gildi og í staðin var Pensionsbeskatningsloven sett í gildi.

Hóast nýggj eftirlønarlóg verður sett í gildi, verður verandi rentutryggingarlóg framvegis í gildi fyri allar inngjaldingar til og við 2013, og verða hesi inngjøld útgoldin sambært ásetingum í rentutryggingarlógini.

**Ásetingar í hesari lóg (*Eftirlønarlógin*)**

*Øll á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda 15 prosent til eftirløn í seinasta lagi í 2028*
Sambært uppskotinum skulu allir borgarar á arbeiðmarknaðinum, ið eru millum 21 ár og fólkapensjónsaldur, gjalda til eftirlønarsamansparing. Rindast skal til eftirlønarsamansparing av øllum A-inntøkum og B-inntøkum.

Bundna gjaldið verður í 2014 sett til 1%, og hækkar tað síðani við einum prosentstigi um árið, til tað í 2028 er komið upp á kravdu 15 prosentini. Talan verður sostatt um eina langa skiftisskipan. Hetta er neyðugt fyri at tryggja, at gjaldførið hjá teimum, sum í dag rinda lítið ella onki eftirlønargjald ikki skal gerast so vánaligt, at tey ikki fáa svarað hvørjum sítt.

Øll inngjøld til eftirlønarsamansparing sambært hesi løgtingslóg verða skattað við 40%, og við útgjald verða hvørki skattur ella avgjald rindað til landskassan.

*Eftirlønin verður sett saman av trimum sløgum av útgjaldi:*

1. <u>Lívlang veiting (ofta nevnt Lívrenta).</u>

Minst 45% av samansparingini skal fara til lívlanga veiting. Hetta er ein eftirlønartrygging, har tann sum hevur rætt til veitingina fær eitt fast eftirlønarútgjald so leingi hann er á lívi. Um ynski er um tað, ber eisini til at áseta, at lívrentan kann arvast av hjúnarfelaga e.l., um so er, at

tann sum hevur stovnað lívrentuna doyr, men tað hevur sjálvandi við sær, at lívrentan verður lægri enn annars.

2. Lutaeftirløn.

Er ein eftirlønarsamansparing, har samansparda virðið við útgjald verður býtt yvir í minsta lagi 10 ár. Tá øll uppsparda upphæddin er útgoldin steðga útgjaldingarnar. Í mesta lagi 55% av samansparingini kann útgjaldast sum lutaeftirløn.

3. Kapitalútgjald.

Kapitalútgjald er eitt útgjald í einum, tá hin einstaki byrjar útgjald av eftirlønarsamansparingini. Kapitalútgjaldið er ásett til at vera í mesta lagi at 15 prosent av samlaða virðinum á eftirlønarsamansparingini.

Omanfyrinevndu tríggjar ásetingar tryggja, at tann einstaki spararin hevur eina rímiliga stóra eftirløn tey fyrstu 10 árini av pensjónistalívinum og síðani eina minni eftirløn, so leingi hann er á lívi.

*Einki útgjald fyrr enn við pensjónsaldur*

Eftirløn kann sum høvuðsregla í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá fólkapensjónsaldrinum. Hesin er í dag 67 ár. Útgjald av kapitaleftirløn, lívlangari veiting og lutaeftirløn byrja samstundis og í seinasta lagi, tá persónurin fær fólkapensjón. Við ikki at loyva útgjald fyrr enn við pensjónsaldur tryggjar landskassin sær, at samansparingin er óbrúkt, til uppspararin røkkur fólkapensjónsaldri.

*Tryggingar*

Av ásetta inngjaldinum kann ein partur verða nýttur til trygging í sambandi við deyða ella óarbeiðsføri, tó ongantíð meira enn ein triðingur av bundna inngjaldinum. Aðrar tryggingar kunnu sjálvandi verða partur av avtaluni við tryggingarfelagið, men hesar eru ikki umfataðar av hesari løgtingslóg.

*Frítøka fyri tænastumenn*

Tænastumenn fáa sum part av setanini rætt til eftirløn. Um teir eisini gjalda til eftirløn sambært hesi løgtingslóg av tænastumannalønini, fara teir at fáa tvær eftirlønir. Tí verður ikki álagt tænastumonnum at gjalda til bundnu eftirlønina av tænastumannalønini, men teir skulu rinda eftirlønargjald av allari aðrari A- og B-inntøku, ið teir hava umframt tænastumannalønina.

*Inntøka forvunnin uttanlands*

Inntøka, ið er forvunnin uttanlands er B-inntøka og tískil áløgd at rinda til eftirløn sambært Eftirlønarlógini.

*Persónar, ið eru fevndur av eftirlønarskipan uttanlands sum part av arbeiðssáttmála við útlendskan arbeiðsgevara har arbeiðið verður útint uttan fyri Føroyar*

Uttanlandsinntøka er, sum sagt, fevnd av eftirlønargjaldinum. Men tað er soleiðis, at fleiri teirra, sum arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, gerast fevndir av eftirlønarskipanum uttanlands. Tað ber ikki til at áleggja útlendskum eftirlønarfeløgum at fylgja hesari løgtingslóg, og tað er heldur ikki rætt at áleggja hesum persónum, umframt at rinda til útlendska eftirlønarskipan, eisini at rinda til eina føroyska skipan sambært hesari løgtingslóg.

Skotið verður tí upp, at hesir persónar kunnu verða undantiknir hesi løgtingslóg, við atliti at teirri inntøku, ið er fevnd av útlendskari eftirlønarskipan. Men undantak er treytað av, at tann

eftirlønarskipanin, sum teir eru fevndir av uttanlands er nøktandi. Tað vil siga, hevur við sær áleið líka nógva uppsparing sum ein eftirlønarskipan sambært hesari løgtingslóg hevur.

TAKS fer í kunngerð at áseta hvørjar treytir ein útlendsk eftirlønarskipan skal uppfylla fyri at verða nøktandi.

*Frítøka fyri gjald av almannaveitingum*
Almannaveitingar, sum eru stakveitingar ella brekbøtandi veitingar, skulu ikki gjalda til eftirløn, meðan aðrar (fyribils) veitingar, sum koma í staðin fyri lønarinntøku, skulu gjalda til eftirløn. Hetta merkir, at eitt nú uppihaldsveitingar sambært forsorgarlógini skulu gjalda til eftirløn, og samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpin heima (ansingarløn), veitingar til endurbúgving og fyribilsveitingar eisini skulu gjalda til eftirløn. Hetta er eitt nú eisini galdandi fyri samsýning veitt til fosturforeldur sambært barnaverndarlógini.

Einki krav er sostatt um, at fyritíðarpensjónistar skulu gjalda til eftirløn av sjálvari pensjónsveitingini, sum er ein verandi veiting, men eftirlønargjald skal gjaldast av aðrari A- ella B-inntøku, ið pensjónisturin kann hava.

*Frítøka fyri lesandi*
Lesandi í Føroyum eru undantikin gjaldi til eftirløn av útbúgvingarstuðlinum. Men hava tey aðra A- ella B-inntøku, skal eftirlønargjald rindast um talan er um fólk, sum eru 21 ár ella eldri.

Lesandi uttanlands, sum hevur varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar, eru undantikin hesari lóg, við atliti at inntøku tey vinna uttanlands.

*Frítøka fyri persónar, sum arbeiða í Føroyum styttri tíðarskeið.*
Endamálið við løgtingslógini er at tryggja, at fólk í Føroyum spara nóg nógv upp til tey verða pensjónistar. Tí er ongin orsøk til at áleggja fólki at fylgja hesi løgtingslóg, sum eftir øllum at døma, ikki fara at búgva her sum pensjónistar. Hetta hevur bara við sær, at tey koma at hava eina lítla eftirløn hangandi eftir sær í nógv ár aftaná, at tey eru farin úr Føroyum. Eisini kann hetta fáa onkran teirra at setast aftur.

Tí er ásett, at persónar, sum arbeiða í Føroyum í eitt lívstíðarskeið styttri enn 60 mánaðir kunnu verða undantiknir frá hesari løgtingslóg. Tað vil siga, at alt sum hesir persónar forvinna, verður skattað sum vanlig skattskydug inntøka eftir skattalógini og onki verður inngoldið til eftirløn. Hesi kunnu sjálvandi flyta pening til útlendska eftirløn, men hetta verður gjørt av skattaðum pengum og ikki sambært hesari løgtingslóg.

*Hámark fyri tvungnum inngjaldi til lógarbundnu eftirlønina*
Eingin borgari verður kravdur árliga at rinda meira enn 150.000 kr. áðrenn skatt til lógarbundnu eftirlønina. Endamálið við løgtingslógini er, at allir borgarar skulu hava eina hóskandi samansparing, tá teir røkka pensjónsaldri. Um einki hámark er, so er vandi fyri, at samlaða samansparingin verður órímiliga stór hjá teimum, sum hava sera stóra inntøku.

*Onki hámark fyri sjálvbodnum inngjaldi til eftirløn*
Tað er onki hámark fyri, hvussu nógv kann rindast inn til eftirløn árliga, men øll inngjøld skulu fylgja ásetingunum í hesi lóg.

*Íløgureglur*
Uppsparda eftirlønin má verða investerað forsvarliga, og uttan at spararin átekur sær ov stóran váða. Tað verður tí ásett, at parturin av samansparingini í peningastovni, sum kann setast í partabrøv, skal minka, so hvørt sum persónurin nærkast pensjónsaldrinum.

Ein lítil partur av spararunum velur at røkja sínar íløgur sjálvur. Løgtingslógin ásetir, at virðisbrøv bert kunnu handlast gjøgnum eftirlønarveitara. Sostatt ber ikki til hjá eftirlønarsamansparara at gera børshandlar um netbanka. Hetta er fyri at tryggja at spararin fær neyðuga ráðgeving og vegleiðing.

*Útgjald ella flyting til hjúnafelaga við deyða*
Tá eftirlønarskipan og tryggingarskipan verða stovnað, skal tryggingartakarin samstundis taka støðu til, hvør skal fáa tryggingina og samansparingina, tá hin tryggjaði doyr. Hetta verður nevnt at innseta ein njótunartilskilaðan. Innsetan av njótunartilskilaðum setir ikki til síðis vanligu arvareglurnar, sum t.d. reglurnar um tvangsarv, og heldur ikki verða settar tilsiðis aðrar avtalur sum eru galdandi.

Tað verður møguligt hjá hjúnum og sambúgvandi at kunna flyta frá eftirlønarkontu hjá tí deyða til eftirlønarkontu hjá tí eftirlivandi partinum. Tað verður somuleiðis møguligt at fáa ein part útgoldnan uttan at rinda avgjald og skatt til landskassan.

*Eftirlønarsamansparingin kann flytast millum hjúnafelagar í sambandi við hjúnaskilnað*
Møguligt verður hjá hjúnafeløgum sum part av, at búgvið verður skift í samband við hjúnaskilnað, at flyta uppspardar eftirlønarupphæddir millum eftirlønarkontur hjá hvørjum øðrum uttan at hetta verður mett sum útgjald.

*Inngjald skal fara til føroyskan eftirlønarveitara*
Sambært uppskotinum verður tað eitt krav, at goldið verður til eftirlønarveitara, ið er skrásettur og hevur heimstað í Føroyum.

Orsøkin til kravið um føroyskan eftirlønarveitara er tann, at hetta ger tað møguligt hjá føroyskum myndugleikum at krevja, at henda løgtingslóg verður fylgd. Eisini verður tað lættari at halda eyga við bæði inngjøldum og útgjøldum. Harumframt fer tað at gera løgtingslógina nógv lættari og bíligari at umsita.

*Samansparari kann ikki verða álagdur at rinda til ávísan veitara*
Fyri at tryggja kapping er ásett, at samansparari kann ikki verða álagdur sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara at rinda eftirløn til ávísan veitara. Kann annar veitari bjóða somu tænastur sum sáttmálin krevur, skal samansparari kunna velja annan veitara.

Gjørt verður vart við, at ásetingin er einans galdandi fyri eftirløn og ikki fyri tryggingar í sambandi við óarbeiðsføri ella deyða. Í sambandi við tryggingar er tað onki í lógini sum forðar fyri, at ásett verður í sáttmála, at trygging skal rindast til ávísan veitara.

*Skiftisskipan fyri spararar, ið gjalda til danskar eftirlønarskipanir*
Neyðugt verður tó ikki hjá teimum, sum higartil hava havt avtalu við danskan eftirlønarveitara at flyta til føroyskan eftirlønarveitara. Hesi kunnu halda fram við teirra núverandi skipan og harvið sleppa undan ásetingunum í hesari lóg. Men eftirlønarskipanir stovnaðar eftir at henda lóg er komin í gildi, ella sum ikki vóru virknar, tá ið henda lóg kom í gildi kunnu ikki halda fram sambært skiftisskipan.

Tað eru tvær treytir fyri um haldast kann fram at rinda til danska eftirløn sambært skiftisskipan. Tann fyrsta er, at onki skal rindast til kapitaleftirløn. Og tann seinna er at rinda verður í minsta lagi 15% av føstu árslønini. Hetta er fyri at tryggja, at talan er um eina nøktandi eftirlønarskipan.

*Skiftisskipan fyri fólk fødd fyri 1954*
Tey, sum eru fødd fyri 1. januar 1954 eru frítikin frá hesari løgtingslóg. Men kunnu sjálvboðin gjalda til eftirløn sambært hesi løgtingslóg, um tey ynskja tað.

*Ígildiskoma*
Lógin kemur í gildi 1. januar 2014.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar og umsitingligar avleiðingar fyri landið. Umsitingarligi kostnaðurin hjá TAKS til íverksetan verður mettur til 1,1 mió. kr. í 2013.

Einsamalt virkar uppskotið ikki tálmandi fyri útreiðslur landskassans, herundir serliga útreiðslur til fólkapensjón. Men tað er soleiðis, at uppskotið styrkir um inntøkugrundarlagið hjá framtíðar fólkapensjónistum, og hevur harvið við sær, at framtíðar fólkapensjónistar fáa minni brúk fyri fólkapensjón enn teir annars vildu havt. Men hvørja ávirkan henda økta uppsparingin skal hava á, hvussu framtíðar fólkapensjónin skal verða samansett og mótrokað, er ikki avgjørt enn. Hetta verður støða tikin til, í sambandi við, at restin av lógaruppskotunum í sokallaðu Pensjónsnýskipanini fara verða viðgjørd í vár og síðani framløgt í heyst.

Uppskotið hevur við sær, at ein vaksandi partur av lønini verður tikin burtur úr grundarlagnum fyri skattskyldugu inntøkuni til land og kommunur eftir skattalógini. Í staðin verður rindaður eftirlønarskattur, sum allur fer í landskassan. Samanlagt verður tískil talan um, at inntøkur landskassans fara at vaksa næstu 10 árini, so hvørt sum inngjaldsprosentið økist upp í 15, meðan inntøkurnar hjá kommununum og sosialu grunnunum hinvegin fara at minka sama tíðarskeið.

Persónar, ið eru fult skattskyldugir til Føroyar og sigla undir FAS-skipanini eru fevndir av hesi lóg og skulu rinda ásetta eftirlønargjaldið. Hetta hevur við sær eina skattahækking fyri hesar persónar, tí at eftirlønarskatturin er 40 prosent, meðan skatturin undir FAS er 35 prosent. Men hinvegin hevur lógin við sær, at hesir nú kunnu rinda til eina eftirlønarskipan uttan at gjalda kapitalvinningsskatt av rentutilskrivingini, hetta kundu hesir persónar ikki frammanundan. So fyri perónar undir FAS er talan um bæði neiligar og jaligar fíggjarligar avleiðingar.

Lógaruppskotið hevur við sær bæði jaligar og neiligar avleiðingar fyri pensjónsveitarar. Tvungið eftirlønargjald og krav um føroyskan veitara, hevur við sær munandi vøkstur í virkseminum. Men hinvegin verða teimum álagdar fleiri umsitingarligar byrðar.

Lógaruppskotið hevur bæði positivar og negativar sosialar avleiðingar. Fleiri verða nú tryggjaði móti fátækradømi í aldurdóminum. Men hinvegin, hevur uppskotið eisini við sær, at eftirlønargjald skal rindast av útgjaldi úr ALS og Barsilsskipanini og eisini av almannaveitingum, ið eru fyribils og eru í staðin fyri løn. Verða hesi útgjøld ikki hækkaði, soleiðis at hædd verður tikin fyri eftirlønargjaldinum, fer hendan lógin at hava við sær, at hesi útgjøld fara at minka, tí lógin ásetir, at eftirlønargjald skal takast av veitingini frá 1. Januar 2014. Fyri borgarar, sum í dag ikki gjalda til eftirlønarsamansparing, fer uppskotið at hava við sær versnandi gjaldføri so hvørt, sum inngjaldið hækkar upp í 15 prosent av lønini.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur stórar avleiðingar fyri vinnuna sum heild tí flestu vinnugreinar eru fevndar av kollektivum sáttmálum. Tó fer tað at ávirka teir arbeiðsgevararnar, hvørs starvsfólk ikki gjalda til eftirløn, at nú skal eftirlønaravtala gerast við øll starvsfólk.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur beinleiðis avleiðingar fyri altjóða avtalur og reglur.

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | (Ja) |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

## Kap. 4. Serligar viðmerkingar

### Ad. § 1:

**Til stk. 1.**
Frameftir skulu øll, ið eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum, rinda til eftirløn av forvunnu peningaupphæddini, ið er fingin til vega vegna lønt arbeiði. Talan er um persónar, sum hava fylt 21 ár men ikki nátt f´ólkapensjónsaldri, sum skulu gjalda til eftirlønarsamansparing við frádráttarrætti, og tí sum á fakmáli verður nevnt burtursíggingarrætti í skattskyldugu inntøkuni. Frádráttarrættur hevur við sær, at skattskylduga inntøkan minkar samsvarandi inngjaldi til eftirløn. Skyldan at rinda til eftirløn fevnir um allar arbeiðsbólkar á arbeiðsmarknaðinum, sum til dømis privat sett, alment sett, sjálvstøðug vinnurekandi, frítíðaravloysarar og øll inntøka, eisini samsýning fyri fundarpening, viðbøtur o.s.fr.

Tá talan er um setanarviðurskifti á bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðinum, er eftirlønargjald ein partur av lønini, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava gjørt avtalu um. Avtalurnar eru gjørdar av fakfeløgum, sum hava samrátt seg til eftirlønargjald við arbeiðsgevarar. Talan hevur verið um prosentpart av lønini, ið er rindað til eftirløn.

Á privata arbeiðsmarknaðinum, har eingin fakfelagssáttmáli er galdandi, hevur eftirlønin verið avtalað millum arbeiðsgevara og starvsfólk. Kortini eru tað fleiri starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum, ið ikki hava havt eitt eftirlønargjald knýtt at lønini. Fleiri arbeiðsgevarar hava enntá rindað eftirlønargjaldið afturat lønini, og so hevur tað verið starvsfólkið sjálvt, ið hevur gjørt av, um eftirløn verður rindað ella ikki. Í slíkum førum hava tey allar flestu starvsfólkini valt at fáa eftirlønina sum vanliga løn og hava tí onga eftirlønarsamansparing.

Orðingin fevnir um øll á arbeiðsmarknaðinum, ið hava fulla skattskyldu til Føroya, við undantak m. a. fyri tey, ið eru fødd fyri 1. januar 1954, sum er ásett í § 17 í skiftisásetingini í hesi løgtingslóg, ið kunnu velja at rinda inn til eftirløn. Tað verður mett at hesi fólkini einans hava eitt sera stutt tíðarskeið at spara saman í, í mesta lagi umleið fýra ár og kravdi prosentparturin er lítil at byrja við. Tá kann talan vera um kostnaðarmiklar umsitingarligar avleiðingar fyri bæði eftirlønarsamansparara, eftirlønarveitara og fyri TAKS. Bundna eftirlønargjaldið er ætlað at fevna um eitt longri lívstíðarskeið enn tey fýra árini, tí er undantakið ásett í lógina.

At skyldan at rinda eftirløn fevnir um tey, ið eru fult skattskyldug er grundað á fleiri viðurskifti. Fyri tað fyrsta, so er tað at stovna og hava eina virkna eftirlønarskipan samantvinnað við eitt rímiligt inngjald til eftirlønarskipanina, tí umsitingarkostnaður er eisini ein týðandi partur av eftirlønarsamansparingini og kann tyngja samansparingina rættiliga nógv.

Tey, ið eru avmarkað skattskyldug, eru einans upp til 180 dagar í Føroyum, og fleiri eru væl styttri tíðarskeið enn 180 dagar, og tá eru umsitingarkostnaðurin fyri bæði eftirlønarveitara og eftirlønarsamanspara ov stórur til, at tað lønar seg at spara saman til eftirløn. Ein, ið er fevndur av avmarkaðari skattskyldu, skal ikki rinda eftirløn. Tá persónur við avmarkaðari skattskyldu fær goldið løn um afturhaldsskipanina hjá TAKS, verður skattur afturhildin sambært § 2 í løgtinglóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin).

Tað er rímiliga lætt at umsita eftirlønarsamansparing hjá teimum, ið eru fult skattskyldug alt árið. Støðan hjá teimum, ið fyrst eru avmarkað skattskyldug og síðani gerast fult skattskyldug, er eitt sindur øðrvísi. Avmarkað skattskyldug eru í mesta lagi 180 dagar í Føroyum og rinda eitt

ávíst prosentgjald í skatti av allari inntøku síni, uttan nakran frádráttarmøguleika í skattskyldugu inntøkuni. Men gerast tey fult skattskyldug í árinum orsakað av, at tey hava verið meira enn 180 dagar í Føroyum, so gerast tey fevnd av løgtingslógini um eftirlønarskipan, og skulu byrja at rinda eftirlønarinngjald, men fyrst frá tí dagi, ið tey gerast fult skattskyldug, uttan so, at tey søkja um at vera frítikin fyri at rinda til eftirløn sambært stk. 5, tí tey eru í einum tíðaravmarkaðum starvi. Kravið um at rinda eftirløn, tá tey gerast fult skattskyldug, er serliga av fyrisitingarligum atliti. Um talan var um at alt innvinningar tíðarskeiðið skuldi verið fevnt av eftirlønarinngjaldi, vildi tað viðført, at øll arbeiðsmarknaðargjøld skuldu umroknast, umframt at ein skattumlíkning skuldi verið gjørd.

Fyri tað næsta hevði ein slík eftirlønarskipan eisini fevnt um útlendingar, herundir útlendingar, ið sigla undir FAS-skipanini. Ætlanin við FAS-skipanini er ikki, at slíkir persónar skulu vera við í eftirlønarskattaskipan í Føroyum, tí persónarnir eru møguliga fevndir av øðrum eftirlønarreglum í teirra heimlondum. Teir føroyingar, ið sigla undir FAS-skipanini og hava fulla skattskyldugu til Føroyar, skulu rinda til egna eftirlønarsamansparing sambært hesi løgtingslóg.

Í setanarviðurskiftum er eftirlønargjald ein partur av lønini, ið sáttmálapartarnir hava samrátt seg til.

Tað verður lagt upp til, at persónur, ið flytur til Føroya í styttri tíðarskeið enn 60 mánaðir í tíðaravmarkað starv kann søkja TAKS um undantak, sjá stk. 5.

Ásetingin um, at persónur, ið hevur fylt 21 ár men ikki nátt fólkapensjónsaldur, skal rinda til eftirlønarsamansparing, fevnir um tað bundna gjaldið. Tað er kortini einki, ið forðar fyri, at persónur, ið er yngri enn 21 ár og persónur, ið hevur nátt fólkapensjónsaldur men ikki fær fólkapensjón, rindar sambært arbeiðsgevaraskipan ella sjálvboðið inn til eftirlønarskipan við frádráttarrætti í skattskyldugu inntøkuni.

**Til stk. 2.**
Sambært løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirløn við seinni broytingum er talan um eina tilsøgn frá landinum um eftirløn, ið er knýtt at tænastumannastarvinum.

Lønti tænastumaðurin vinnur sær nóg mikið av eftirlønarrættindum og peningarættindum so at honum nýtist ikki at vera fevndur av hesi løgtingslóg, tá talan er um løn frá tænastumannastarvinum. Tænastusett hjá danska statinum, sum útinna arbeiði í Føroyum, eru somuleiðis fevnd av áseting um tænastumannasetan, um tey kunnu skjalprógva tænastumannasetanina. Øll onnur inntøka, ið tænastumannasetti forvinnur, kemur undir vanligu ásetingina í § 1, stk. 1.

Tey starvsfólk, ið eru sett í starv hjá tí almenna undir heitinum "tænastumannalíknandi starv, uttan at vera tænastumannastarv" ella líknandi orðing, skulu gjalda til eftirløn sambært áseting í § 1, stk. 1, um tey ikki í setanarsáttmála hava áseting um, at tey vinna sær eftirlønarrætt eins og tænastumannasett sambært løgtingslóg um tænastumannaeftirløn.

**Til stk. 3.**
Eftir § 1, stk. 3 í skattalógini kunnu føroysk lesandi varðveita fulla skattskyldu til Føroyar, meðan tey eru uttanlands í lestrarørindum. Lesandi, ið hava varðveitt fulla skattskyldu til Føroyar, meðan tey eru lesandi uttanlands, eru undantikin gjaldskyldu til eftirlønarskipan fyri lønarinntøku uttanlands, men hava tey inntøku í Føroyum skal rindast til eftirløn.

**Til stk. 4.**
Henda áseting vil gera greiðan skilnað millum, at tá fólk eru byrjað útgjald av eftirløn, skal ikki rindast eftirlønarinngjald, sostatt kunnu tey frá einum arbeiðsgevara fáa eftirlønarpartin rindaðan sum vanliga løn.

**Til stk. 5.**
Tað verður lagt upp til, at persónur, ið flytur til Føroya í styttri lívstíðarskeið enn 60 mánaðir í tíðaravmarkað starv, kann søkja TAKS um undantak fyri at skula rinda eftirløn til eina føroyska eftirlønarskipan. Tá talan er um tíðarskeið uppá 60 mánaðir, verður tað meint sum, eitt lívstíðarskeið, soleiðis at hetta 60 mánðar tíðarskeið er bert galdandi einaferð.

Tann lønarupphædd, ið ein arbeiðsgevari rindar til starvsfólkið, verður skattað sum vanlig skattskyldug inntøka eftir skattalógini, og onki verður goldið til eftirløn. Tað merkir, at eingin eftirløn verður rindað, og heldur eingin burtursígginarrættur ella skattafrádráttur verður givin í skattskyldugu inntøkuni. Starvsfólkið kann sjálvandi flyta pening til útlendska eftirløn, men hetta verður gjørt av skattaðum pengum, og ikki sambært hesari løgtingslóg.

Í Danmark ber til hjá hesum persóni at rinda til danska eftirlønarskipan sambært § 53A í donsku Pensionsbeskatningsloven og fáa eftirlønina goldna útaftur, uttan at rinda avgjald og skatt í Danmark av útgjaldinum.

Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð nærri reglur.

**Til stk. 6.**
Áseting um at persónur, ið er yngri enn 21 ár, kann inngjalda til eftirløn, er grundað á, at tað eru fleiri ung fólk, ið eru í vinnu og fevnd av starvssáttmála, ið hevur áseting um eftirlønargjald. Soleiðis ber tað til hjá teimum til at rinda sjálvboðið eftirlønargjald.

**Til stk. 7.**
Persónur, ið fær føroyska fólkapensjón, kann ikki rinda til eftirløn sambært hesari lóg. Hetta er ásett í lógini fyri at tryggja, at eftirlønarsamansparing kemur til útgjaldingar, meðan persónurin er pensjónistur.

**Til stk. 8.**
Persónur sambært § 1, stk. 1, ið ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan, hevur skyldu til at stovna eftirlønarkontu í samband við starvssetan.

Freistin at stovna eftirlønarkontu er sett til 1. januar 2014. Freistin at stovna eftirlønarkontu er fyri tey, ið eru 21 ár og eldri, men fevnir ikki um tey, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1954, tey kunnu eftir egnum ynski stovna og rinda til eftirløn. Persónur, ið verður 21 ár eftir 1. januar 2013, skal í seinasta lagi á 21 ára føðingardegi sínum stovna eina eftirlønarkontu um viðkomandi er í løntum starvi. Tað er einki í hesi lóg, ið forðar fyri, at persónur yngri enn 21 ár stovnar eftirlønarkonto og rinda eftirlønargjald. Her verður serliga hugsað um tey, ið eru í starvi og ynskja at rinda til eftirløn. Mest sannlíkt er at starv teirra er fevnt av einum kollektivum starvssáttmála, og skulu tey tá rinda eftirløn.

**Til stk. 9.**
Ætlanin er, at eisini persónar, sum arbeiða uttanfyri Føroyar skulu verða fevndir av hesari løgtingslóg. Uttanlandsinntøka er B-inntøka, og skal sostatt rinda bundna eftirlønargjaldið sambært § 2, stk. 1.

Men tað er soleiðis, at fleiri teirra, sum arbeiða uttanlands hjá útlendskum arbeiðsgevara, gerast fevdir av eftirlønarskipanum uttanlands. Tað ber ikki til at áleggja útlendskum eftirlønarfeløgum at fylgja hesari løgtingslóg, og tað er heldur ikki rætt at áleggja hesum persónum, umframt at rinda til útlendska eftirlønarskipan, eisini at rinda til eina føroyska skipan sambært hesari løgtingslóg.

Skotið verður tí upp, at hesir persónar kunnu verða undantiknir hesi løgtingslóg, við atliti at teirri inntøku, ið er fevnd av útlendskari eftirlønarskipan. Men undantak er treytað av, at tann eftirlønarskipanin, sum teir eru fevndir av uttanlands er nøktandi. Tað vil siga, hevur við sær áleið líka nógva uppsparing sum ein eftirlønarskipan sambært hesari løgtingslóg hevur.

TAKS fer í kunngerð at áseta hvørjar treytir ein útlendsk eftirlønarskipan skal uppfylla fyri at verða nøktandi.

Gjørt verður vart við, at hava hesir persónar aðra inntøku, skal rindast til eftirløn sambært hesari løgtingslóg.

**Ad. § 2:**

**Til stk. 1.**
Sambært løgtingslógini skal rindast eitt ávíst prosenttal til eftirløn av A-inntøku og B-inntøku. At rindast skal av A-inntøku merkir, at eftirlønargjald eisini verður rindað av t.d. útgjaldi frá arbeiðsloysisskipanini og útgjaldi frá barsilsskipanini. Eisini løn frá FAS-skipanini er fevd av eftirlønargjaldi, treytað av at móttakarin er fult skattskyldugur og búsitandi í Føroyum.

Ætlanin er at eftirlønargjald skal rindast av øllum veitingum sum eru løn, ella koma í staðin fyri løn. Til dømis av útgjaldi frá dagpeningaskipanini og av øllum peningaútgjøldum, sum eru endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Sama er galdandi fyri peningaupphædd, ið kemur í staðin fyri lønt arbeiði, t.d. samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima (ansingarløn), endurbúgving og fyribilsveiting sambært lóggávu á almannaøkinum og alla uppihaldsveitingar sambært forsorgarlógini, ið koma ístaðin fyri lønarinntøku. Høvuðsorsøkin til hetta er, at hesi fólk, ikki skulu gerast verri fyri sum eldri, um tey koma í ein ella fleiri av hesum lívsstøðum part av lívinum. Av tí at talan er eisini um eina trygging, ið er knýtt at eftirlønarinngjaldinum, er tað av allar størsta týdningi, at hesi fólkini eru fevnd av nøktandi tryggingum.

Ásetingin í stk. 1 uppá 1 prosent er at rokna sum eitt minsta mark, soleiðis at skilja, at um partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava avtalað ein hægri prosentsats, so er hesin galdandi.

Ásetingin um 1 prosent í 2014 er ætlað teimum, ið frammanundan ikki hava eftirlønarskipan. Eftirlønarskipanir, ið eru skipaðar sum kollektivar eftirlønarskipanir, stovnaðar við sáttmála millum arbeiðsgevarafeløg og fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum ella ímillum ein ávísan arbeiðsgevara og allar arbeiðstakarar, sum starvast í virkinum hjá arbeiðsgevaranum, kunnu halda áfram við støði í tí, sum sáttmálin sigur, og í minsta lagi tí prosentupphædd, ið er ásett í hesari løgtingslóg.

Prosentsatsirnir fyri árini 2014 og fram til 2028 eru gjørdir stigvísir, fyri at skiftið frá 1 prosentum til 15 prosent ikki skal kennast ov brádligt hjá teimum, ið ikki enn eru byrjað upp á eftirlønarsamansparing. Tað vil til eina og hvørja tíð standa sáttmálapørtunum frítt at rinda meir til eftirløn enn ásett í hesi løgtingslóg.

Tað skal eisini gjaldast eftirlønargjald sambært áseting í hesi grein av samsýning fyri nevndararbeiði og aðrari samsýning, ið er A-inntøka.

Øll tey, sum í dag hava eina eftirlønarskipan, har prosentparturin er hægri enn 1 prosent, kunnu halda fram at gjalda tað sama prosentgjaldið til eftirlønarskipanina, sum tey higartil hava gjørt, sum ásett er í starvssáttmálanum. Í 2028 skal eftirlønarinngjaldið vera minst 15 prosent av inntøkuni.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu prosentparturin er hjá ymisku yrkisbólkunum, enntá eru nakrir fakbólkur, sum í dag rindar 18 prosent í eftirlønargjaldi.

**Til stk. 2.**
Tað er arbeiðsgevarin, ið flytir eftirlønina til eftirlønarveitara vegna eftirlønarsamansparara. Rindast skal umvegis afturhaldskipanina hjá TAKS, samstundis sum lønin verður flutt.

**Til stk. 3.**
Sambært hesi áseting er møguligt sjálvboðið at inngjalda til eina eftirlønarskipan.

Øll inngjøld fylgja reglunum um frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni og rinda eftirlønarskatt við inngjaldi.

**Til stk. 4.**
Árlig eftirlønarsamansparing upp á 150.000 krónur netto fevnir eisini um tryggingarpartin av inngjaldinum. Upphæddin 150.000 krónur er ásett fyri, at gjaldið ikki skal vera órímiliga stórt fyri tær høgu inntøkurnar. Tað vil siga, at um eftirlønargjaldið er 15 prosent av inntøkuni, so verður onki goldið av tí partinum av inntøkuni, sum er omanfyri 1 mió. kr. um árið.

Mett verður, at tað skal vera samsvar ímillum, hvat ein eftirløntur persónur skal brúka av eftirlønarsamansparing við eftirlønaraldur og tað gjald, hann verður kravdur eftir við støði í A-inntøkuni og B-inntøkuni.

Fyri eftirlønarinngjald, ið er omanfyri 150.000 krónur árliga, kann tann parturin av upphæddini, sum er omanfyri 150.000 krónur, verða goldin út aftur av eftirlønarsamansparing, um søkt verður um tað hjá TAKS. Umsóknin, ið eftirlønarveitari sendir vegna eftirlønarsamansparara til TAKS um útgjald, skal vera TAKS í hendi í seinasta lagi 1. juni árið eftir, at inngjaldið er goldið. Tíðarásetingin fyri umsóknini er grundað á fyrisitingarlig atlit fyri at forða fyri at skula umlíkna fleiri ár aftur í tíð. Tað verður ikki loyvt at flyta frádrátt fram í tíð.

Eftirlønarinngjald fyri hvørt einstakt inngjaldsár verður upplýst á sjálvuppgávuni/ skattauppgerðini, ið verður send øllum skattskyldugum. Eftirlønarsamansparari kann tí síggja á yvirlitinum, hvussu nógv er inngoldið, eftirlønarskattur umframt kunning frá eftirlønarveitara.

Tað er somuleiðis møguligt at fráboða TAKS, at ein ynskir ikki at rinda eftirlønargjald omanfyri 150.000 krónur, soleiðis at tað sjálvvirkandi steðgar, tá markið er nátt. Tá sleppur ein undan at søkja um at fáa pening endurgoldnan.

**Til stk. 5-7.**
Persónar, ið hava B-inntøkur frá fríari vinnu fáa uppkrav um gjald til eftirlønarsamansparing sambært stk. 1.

Tað er serliga hesin bólkurin av fólki, ið hevur B-inntøku, ið ikki rættiliga er komin í gongd við at spara saman til eftirlønarsamansparing. Við hesum lógaruppskotinum verða persónar, ið hava B-inntøkur, sjálvstøðug vinnurekandi og onnur, eisini fevndir av eftirlønarsamansparing.

Eftirlønargjaldið verður knýtt at v-talinum/p-talinum, áðrenn frádráttur verður veittur.
Eftirlønargjaldið kann vera goldið beinleiðis til eftirlønarveitara. Eftirlønarveitara verður í hesi grein heimilað at flyta eftirlønargjaldið hjá B-skattgjaldara, eins og egin eftirlønarinngjøld sambært stk. 5 gjøgnum afturhaldsskipanina, soleiðis at eftirlønarskattur verður avroknaður beinanvegin. Við afturhaldsskipanina skilst eitt av TAKS góðkendur avrokningarstaði. At hesi leistur er valdur er grundað á at tað skal vera ómakaleyst fyri eftirlønarsamanspara.

Tað ber somuleiðis til at eftirlønargjaldið kann rindast við inngjaldskorti, ið TAKS sendur til persón, ið hevur B-inntøku, um ikki onnur gjaldsavtala er gjørd við eftirlønarveitara.

Eftrilønargjald skal verða inngoldið í seinasta lagi 1. Mai árið eftir inntøkuárið.

Um eftirlønarsamansparari ikki heldur sína skyldu við at rinda eftirlønarinngjaldið sambært stk. 1, verður tann skuldkomna eftirlønin kravd inn við skattauppgerð eins og B-skattur. TAKS kann fremja panting eftir reglunum í § 135 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Skyldar eftirlønarsamansparari bæði skatt og eftirlønargjald, hevur skatturin framíhjárætt.

**Til stk. 8.**
Tryggingar kunnu stovnast sum partur av eftirlønarskipan. Tað er sett eitt hámark fyri, hvussu stórur partur av eftirlønarinngjaldinum fer til tryggingar. Hámarkið fyri gjaldi til tryggingar er sett til ein triðingur av eftirlønarinngjaldinum.

Sera ymiskt er, í hvønn mun tann einstaki hevur tørv á at tryggja seg sjálvan og síni næstu.
Summi hava tørv á at tryggja hjúnafelaga/sambúgva og/ella børn ávíst lívstíðarskeið, meðan onnur hvørki hava hjúnafelaga, sambúgva ella børn undir 18 ár at taka atlit til, og tí kunnu tey spara eina størri peningaupphædd til egna eftirløn.

Sambært hesari lóg kann talan verða um hesar tryggingar í sambandi við óarbeiðsføri og deyða.

Óarbeiðsføristrygging er ein leypandi veiting, sum persónur fær útgoldið, um hann missur arbeiðsførið heilt ella lutvíst.

Viðvíkjandi njótunartilskilaða so er tað nærri útgreinað í viðmerkingunum til § 12.

Eftirlønarsamansparari kennir best til síni egnu lívsviðurskifti í mun til tørv á trygging. Tí verður tað litið upp til eftirlønarsamansparara eftir ráðgeving frá tryggingarveitarunum at áseta tryggingartørvin og tann part av eftirlønarinngjaldinum, ið skal fara til tryggingar.

Mælt verður til, at eftirlønarsamansparari og tryggingarfelag í felag áseta tryggingarpartin, har tann lóggevandi parturin ger karmarnar, ið partarnir sjálvir taka støðu út frá.

**Ad. § 3**

Her eru nevndar inntøkur og peningaupphæddir, ið ikki skal rindast eftirlønargjald av. Nakrar av hesum peningaupphæddum eru ikki fevndar av skattskyldu í § 2, stk. 1. Men, fyri at eingin

iva skal stinga seg upp, hvørt hesar peningaupphæddir eru fevndar ella ikki, er valt at nevna øll hesi undantøkini.

Nr. 2. Barnagjald og barnaískoyti sambært løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 16. frá 2. mars 2011.

Nr. 3. Fólkapensjón og og veitingar til fólkapensjónistar sambært løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 26. mai 2010.

Nr. 4 og 5. Lutaeftirløn og lívrenta. Tað skal ikki rindast eftirlønarinngjald av eftirlønarútgjaldi, hvørki tá talan er um útgjalding av eftirlønarsamansparing til eftirlønarsamansparara sjálvan, ella um talan er um útgjalding av eini fluttari eftirlønarsamansparing frá hjúnafelagi. Hetta er galdandi fyri bæði føroysk og útlendsk eftirlønarútgjøld.

Nr. 6. Tey, ið hava fingið tilsøgn um fyritíðarpensjón, eru fólk, ið hava fingið endaliga tilsøgn um gjald av fyritíðarpensjón fram til eftirlønaraldur, og tá tekur vanlig fólkapensjón við. Tað verður á henda hátt tryggjað fyritíðarpensjónisti lívlanga veiting frá tí almenna. Tey, ið aloftast eru fevnd av fyritíðarpensjón longu frá 18 ára aldri, eru menningartarnað fólk og tey, ið eru sálarliga sjúk. Henda eftirlønarlóg er ein arbeiðsmarknaðareftirlønarskipan og fevnir um persónar, ið eru á arbeiðsmarknaðinum. Kortini eru tað tey, ið hava verið á arbeiðsmarknaðinum gjøgnum styttri ella longri tíðarskeið, ið vegna arbeiðsskaða, óhapp ella sjúku verða tillutað fyritíðarpensjón. Summi teirra hava eftirfylgjandi møguliga niðursetta arbeiðstíð. Løn, ið fyritíðarpensjónistur, ið frammanundan hevur verið á arbeiðsmarknaðinum, vinnur sær við løntum arbeiði, er fevnt av eftirlønarsamansparingargjaldi og útgjaldi sambært ásetingunum í hesi løgtingslóg, hetta er tó ikki galdandi fyri útgjald frá vardum verkstaði, har skal einki eftirlønargjald rindast.

Nr. 7. Avlamisveiting, avlamisviðbót, persónlig viðbót, barnaviðbót, røktarviðbót og hjálparviðbót sambært løgtingslóg nr. 48 frá 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 26. mai 2010.

Nr. 8. Her verður talan um allar útgjaldingar av tryggingum, ið eru inngoldnar sambært hesi lóg. Av tí at inngjaldið er skattað við 40 prosentum, verður útgjaldið goldið út uttan at rindast skal avgjald ella skattur til landskassan.

Nr. 9. Stak og brekbøtandi veitingar umframt barnaviðbót sambært forsorgarlógini. Talan er um stuðul til rímiliga stakútreiðslur, ymiskari meirútreiðslur, útreiðslur sbrt. sjúkuviðgerð, útreiðslur til hjálparráð og bil umframt bustaðarbroytingar, flyting, heimferð v.m.

Nr. 10. Útbúgvingarstuðul, ið lesandi móttaka frá t.d. Studni og Statens Uddanelsesstøtte verður ikki fevndur av inngjaldskyldu til eftirlønarsamansparing.

Nr. 11. Tað skal ikki rindast eftirlønargjald av vinningum frá eydnuspæli, legatum, sømdargávum og líknandi eingangsinntøkum.

Nr. 12. ùtgjald frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Nr. 13. Viðbót til ávísar pensjónistar sambært løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010.

Nr. 14. Ættleiðingarstuðul sambært løgtingslóg nr. 51 frá 3. mai 1994 um ættleiðingarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 105 frá 11. november 2010.

Nr. 15 Stuðul til uppihaldspening sambært løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 136 frá 28. desember 2010.

Nr. 16. Gjald fyri uppihald og lummapening sambært løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavarnd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007.

**Ad. § 4:**

**Til stk. 1-2.**
Eftirlønarsamanspararin eigur persónliga sína eftirløn, ið ikki er undir hansara "ræðisrætti", men er vard fyri úttøku og aðrari rættarsókn frá ognarum. Eftirlønarsamansparingin kann heldur ikki avhendast ella veðsetast, ella verða nýtt sum mótrokning fyri møguligum kravi frá eftirlønarveitara. Við ræðisrætt skilst, at samansparari ikki fysiskt hevur ræðisrætt til peningaupphæddina, men sum samansparari avger hann, um og hvussu samansparingin møguliga skal setast í virðisbrøv o.s.fr.

Eftirløn kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hon er útgoldin. Flyting av eftirløn frá einum eftirlønarveitara til annan eftirlønarveitara er ikki at meta sum útgjald, og kann tí ikki vera fyri rættarsókn.

**Til stk. 3.**
Her er talan um málsøki, ið danskir myndugleikar umsita, nevniliga persóns-, familju- og arvarættur. Men tað er einki í eftirlønarlógini, ið forðar fyri, at bæði eftirlønarsamansparingin og sjálvt eftirlønarútgjaldið verða býtt millum hjúnini í samband við hjúnaskilnað. Henda áseting fevnir um eftirlønarinngjøld, ið eru rindað inn eftir 1. januar 2013. Um lívlong veiting er vald er heldur einki, ið forðar fyri, at hon kann vera býtt millum hjún, men hon verður eftir býtið framhaldandi fevnd av lívlangari veiting.

**Ad. § 5:**

**Til stk. 1.**
Eftirlønarveitarar, ið eru skrásettir og hava heimstað í Føroyum, skulu fráboða TAKS tær eftirlønarskipanir, ið teir veita eftirlønarsamanspararum.

Góðkenning kann einans gerast av eftirlønarskipan, har eftirlønarveitari er skrásettur hjá Skráseting Føroya og hevur heimstað í Føroyum. Hetta merkir, at feløg sum til dømis eru dótturfeløg av útlendskum veitara kunnu góðkennast. Ásetingin er gjørd fyri at tryggja, at eftirlønarveitari fylgjir føroyskari skattalóggávu, tá umræður fráboðnarskyldu til TAKS, og at TAKS hevur heimild at hava eftirlit v.m.

**Til stk. 2.**

*Lívstryggingarfeløg:*
Tryggingarfeløgini fylgja ásetingunum í lóg um tryggingarvirksemi, ið er eitt yvirtikið málsøki sambært heimastýrislógini. Sambært reglunum í tryggingarlógini hevur Tryggingareftirlitið fíggjarligt eftirlit við tryggingarfeløgum. Tryggingareftirlitið hevur ikki beinleiðis eftirlit við tryggingartakarum uttan so, at feløgini t.d. ikki hava hildið reglurnar um góðan sið. Tað er Tryggingareftirlitið, ið við konsesssjón gevur tryggingarfeløgum loyvi at virka í Føroyum, og tað er somuleiðis Tryggingareftirlitið, ið hevur eftirlit við, at galdandi lóggáva verður fylgd innan tryggingarøkið. Eftirlitið fevnir eisini um kostnaðarstøðið og ómaksgjøld. Tryggingareftirlitið skal tryggja, at m.a. ómaksgjøld eru samsvarandi við veruliga kostnaðin, eins og Tryggingareftirlitið skal tryggja, at eftirlønarsamansparing hjá fólki, verður umsitin á ein nøktandi hátt. Lóg um tryggingarvirksemi regulerar ikki avtalurnar millum tryggingarfeløg og tryggingartakarar.

*Peningastovnar:*
Tað er danska Fíggjareftirlitið (Finanstilsynet), ið gevur loyvi til, at peningastovnur kann verða settur á stovn og verða rikin sum peningastovnur. Tað er somuleiðis Fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við føroyskum peningastovnum.

Meðan peningastovnarnir fylgja millum annað “lov om finansiel virksomhed”, ið er danskt málsøki, er tað Fíggjarmálaráðið, ið virkar fyri, at partar av donsku lóggávuni, ið viðvíkja Føroyum, verða settir í gildi við kongligari fyriskipan.

**Til stk. 3.**
Fyri at tryggja gjøgnumskygni er tað ásett í sjálva lógina. Eisini kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta, hvussu veitarar skulu upplýsa kundum sínum gjøld síni.

**Til stk. 4.**
Fyri at tryggja kapping millum eftirlønarveitarar er ásett, at fakfeløg, arbeiðsgevarar og onnur ikki kunnu áleggja einum eftirlønarsamansparara at verða kundi í einum ávísum eftirlønarfelag. Kann annar eftirlønarveitari bjóða somu treytir sum tað felagið, sum t.d. fakfelagið hevur sáttmála við, skal tað verða uppsparara frítt at skifta felag.

Gjørt verður vart við, at ásetingin er einans galdandi fyri eftirløn og ikki fyri tryggingar í sambandi við óarbeiðsføri ella deyða. Í sambandi við tryggingar er tað onki í lógini sum forðar fyri, at ásett verður í sáttmála, at trygging skal rindast til ávísan veitara.

**Ad. § 6:**

Henda áseting viðvíkir einans eftirlønarveitarum, ið árliga skulu senda TAKS teldutøka kunning, um upplýsingar hjá øllum teimum, ið eru skrásett hjá eftirlønarveitara. Hetta er mannagongd, ið hevur verið brúkt í mong ár. Tíðarásetingin hevur týdning, tí TAKS á hvørjum ári skal senda sjálvuppgávur út til hvønn einstkan skattgjaldara.

Nærri áseting verður gjørd við kunngerð um t.d. hvussu upplýsingar skulu sendast teldutøkar til TAKS.

**Ad. § 7:**

**Til stk. 1.**
Eftirlønarsamansparingar í peningastovni skulu vera á serligari eftirlønarinnlánskontu, í puljum ella serligum virðisbrævagoymslum. Uppspard eftirløn kann støðlast í puljum, sambært reglunum við kunngerð: "bekendtgørelse for Færøerne om puljepension og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v."

**Til stk. 2.**
Virðisbrævahandlar í peningastovnum eru álagdir at fylgja reglunum sambært hesi løgtingslóg og øðrum lógum við kunngerðum, ið eru galdandi innan fíggjarvirksemi, ið er galdandi fyri Føroyar. Talan er í løtuni um m.a. "lov om finansiel virksomhed", "bkg. for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel" og "bkg. om værdipapirhandleres udførelse af ordre". Tað verður á eftirlønarøkinum alla tíðina eitt krav um, at eftirlønarsamansparararin skal verjast á besta og tryggasta hátt. Eftirlønarsamansparararin skal í eftirlønarhøpi verða bólkaður sum smákundi/detailkundi sambært "bekendtgørelse for Færøerne om investorbeskyttelse ved værdipapirhandel", sum er ein partur av MiFID (Markets in Financial Instruments Directive). Handil t.v.s. keyp og søla av virðisbrøvum kann eftirlønarsamansparari einans gera sum smákundi og við persónligum samskifti við peningastovnin, ið hevur skyldu til at veita ráðgeving. Sostatt ber ikki til hjá eftirlønarsamansparara sjálvum at gera børshandlar um netbanka. Hetta er ásett fyri at tryggja, at íløgurnar gerast á ein hóskandi og gagnligan hátt fyri eftirlønarsamansparararan.

**Til stk. 3.**
Tað verður einans loyvt eftirlønaruppspararanum umvegis eftirlønarveitarum at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv sambært reglunum "bekendtgørelse om puljepension om andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v". Tað er danska Fíggjareftirlitið, ið bólkar ymisk lond á ein zone A-lista. At vera bólkaður á hesum lista merkir, at børsirnir (keypsskálarnir) í hesum londum verða mettir sum "serliga" tryggir at gera virðisbrævaíløgur í.

**Til stk. 4.**
Ásett verður, hvussu nógv kann setast í børsskrásett partabrøv alt eftir aldri hjá eftirlønarsamansparara. Partabrøv geva vanliga betri avkast enn lánsbrøv yvir eitt longri áramál. Eftirlønarsamansparing er ein sera long langtíðar íløga. Tað eru tí góðar fakligar grundgevingar fyri at loyva ungum eftirlønarsamanspararum í stóran mun at gera partabrævaíløgur. Hinvegin eru partabrøv ein munandi ótryggari íløga enn lánsbrøv. Tað er tí neyðugt at verja seg ímóti, at samansparar missa stórar partar av eftirlønarsamansparingini stutt áðrenn teir gerast pensjónistar. Partabrævaparturin má tí minka so hvørt, sum samanspararin kemur nærri eftirlønaraldri. Íløgureglurnar eru tí gjørdar soleiðis, at partabrævaparturin støðugt minkar gjøgnum alt inngjalds- og íløgutíðarskeiðið, soleiðis at tá persónurin nærkast eftirlønaraldri, eru einans 30% av partabrøvunum eftir í virðisbrævagoymsluni. Í øllum útgjaldingartíðarskeiðnum av eftirlønarsamansparingini er loyvt at hava 15 prosent í virðisbrøvum av eftirlønarupphæddini.

**Til stk. 5.**
Tryggjast skal, at partabrævaparturin javnan verður rebalanseraður. At rebalansera merkir, at samanspararin kann gera keyp ella skal fremja sølu í íløgurøðini, sum á donskum verður umrøtt sum portefølje, soleiðis at parturin og slagið av íløgum er í tráð við aldur, váða og onnur viðurskifti hjá eftirlønaruppspararanum.

**Til stk. 6.**
Parturin av partabrøvum kann vera komin upp um tað mest loyvda, tí persónur grundað á aldur hevur fingið eitt lægri hámark fyri partabrævaparti sambært talvuni í stk. 1. Partabrævaparturin kann til dømis eisini verða vaksin grundað á kurshækkingar. Munur verður gjørdur á reglunum fyri rebalansering alt eftir aldri hjá eftirlønar-samansparararanum. Hjá samanspararum yngri enn 60 ár verður rebalanserað við at samansparari, sum er komin upp um partabrævahámarkið, bert kann keypa lánsbrøv.

Uppspararin kann ikki keypa nýggj partabrøv, fyrr enn tað kann fara fram innan fyri loyvda hámarkið. Eftirlønarsamanspararin verður sostatt ikki tvungin til at selja út av síni partabrævagoymslu. Nýggj inngjøld á eftirlønarsamansparingina viðvirka til at hækka partin, sum ikki frammanundan er settur í partabrøv. Eftirlønarsamansparari kann eisini selja av partabrævagoymsluni, tá tað er til hansara fyrimun. Á henda hátt verður partbrævaparturin sum frálíður minni.

**Til stk. 7.**
Eftirlønarsamansparari eldri enn 60 ár skal aktivt rebalansera sína íløgurøð, so partabrævaparturin er innan fyri hámarkið í stk. 1. Rebalanserast skal í seinasta lagi fyrsta handilsdagin eftir, at eftirlønarsamanspararin er fyltur ávikavist 60, 65 og 70 ár. Íløgurøð er at skilja sum portefølja á donskum.

**Til stk. 8.**
Orsøkin til uppgerðina av virðisbrævagoymsluni er grundað á útrokningargrundarlagið fyri samlaðu eftirlønarsamansparingina. Tá tann samlaða saldan av virðisbrøvum, lánsbrøvum, innistandandi o.ø. er tøk, ber til at rokna áleið eftirlønarútgjaldsætlan fyri samlaðu eftirlønarsamansparingini, har útgjaldið skal fylgja ásetingini í § 10, stk. 2.

**Til stk. 9.**
Við skylduna hjá eftirlønarveitara meinast, at tá eftirlønarveitari eftir áheitan og sum part av tænastum fyri eftirlønarsamanspararar ger íløgur í virðisbrøv, skulu atlit takast til loyvda prosentpartin í stk. 1.

**Ad. § 8:**

Til stk. 1. Tað verður givin heimild til at gera íløgur. Íløgureglurnar skulu fylgja reglunum í lóg um tryggingarvirksemi, og sambært lógini er Tryggingareftirlitið eftirlitsmyndugleikin.

Um tað skuldi víst seg at verða neyðugt við strangari ella øðrvísi reglum enn teimum, sum longu eru at finna í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, so gevur stk. 3. í hesi løgtingslóg landsstýrismanninum í fíggjarmálum heimild til at áseta nærri íløgureglur fyri tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar í lívstryggingarflokki III,

**Til stk. 2.**
Áseting um, at tryggingarfelagið skal taka hædd fyri støðuni hjá tí einstaka eftirlønarsamansparara og ikki áleggja teimum ov stóran váða, og samstundis skal íløgan vera gagnlig fyri eftirlønarsamanspara. Ásetingin er ætlað sum eitt ískoyti til tær reglur, sum longu finnast í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

**Til stk. 3.**
Kunngerðarheimild at áseta nærri íløgureglur. Tað er bert um hetta ikki virkar nøktandi, at henda heimild skal brúkast.

**Ad. § 9:**

**Til stk. 1.**
Útgjaldið hjá eftirlønarsamansparara kann í fyrsta lagi byrja við 67 ára aldur við undantaki av stk. 5. Útgjaldið kann í seinasta lagi byrja við 70 ára aldur.

Í samansparingartíðarskeiðnum er samlaða virðið, so sum innistandandi peningur, virðisbrøv, lánsbrøv, íløguprógv o.a., ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum lutaeftirløn, um samansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu. Ásetingin tryggjar, at partarnir kunnu varðveita líknandi skipan, ið er galdandi í dag. Avtala kann t.d. gerast einsæris við hvønn einstakan ella í kollektivum eftirlønarsáttmálum. Frá valda útgjaldsdegi er valið, ið er gjørt sambært § 10, stk. 2, galdandi.

**Til stk. 2.**
Summir eftirlønarsamanspararar avgera ikki fyrr enn við pensjónsaldur, hvussu samansparingin skal býtast sundur á ymsu eftirlønarskipanirnar. Pensjónsaldurin er í fyrsta lagi frá 67 ára aldri og í seinasta lagi við 70 ára aldur.

Eftirlønarsamansparari boðar umvegis eftirlønarveitara TAKS frá útgjaldi. Fráboðanin skal vera í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn útgjald byrjar.

Og hvussu og nær samansparda eftirlønin skal útgjaldast. Í minsta lagi 45 prosent av eftirlønarsamansparing skulu nýtast til lívlanga veiting, og í mesta lagi 55 prosent skulu nýtast til lutaeftirløn. Møguleiki er tó fyri at fáa eitt kapitalútgjald upp til 10 prosent av samlaðu samansparingini.

Nr. 1. Lívlong veiting:

Við lívlanga veiting skilst veiting, har útgoldin verður ein ávís mánaðarlig ella árlig peningaupphædd, so leingi tann tryggjaði persónurin er á lívi.

Nr. 2. Lutaeftirløn:
Ein lutaeftirløn er ein eftirløn, sum verður goldin í eins stórum lutum yvir í minsta lagi 10 ár. Útgjaldið kann verða mánaðarliga. Tað ber til at tryggja seg longri enn tey 10 árini. Tað er ikki sett nakað hámark fyri, hvussu nógv ár lutaeftirlønarútgjald kann fevna um. Tað veldst eisini um eftirlønarinngjaldið og virðisøkingina av eftirlønarsamansparingini.

Lutaeftirlønarparturin kann gerast størri enn 55 prosent orsakað av, at peningur kann verða fluttur frá lívlangu veitingini ella kapitalútgjaldi til lutapartin, tí tað er ásett eitt hámark fyri, hvussu stórur partur av eftirlønarsamansparingini skal vera partur av lívlangari veiting, sambært § 10, stk. 4.

Nr. 3. Kapitalútgjald:
Kapitalútgjald er at skilja sum, at í mesta lagi 10 prosent av samansparingini kann verða útgoldið í einum, samstundis sum eftirlønarútgjaldið byrjar.

Eftirlønarsamansparari avger sjálvur, hvussu hann ynskir at spara upp. Nakrir eftirlønaruppspararar gjalda til eina lívlanga veiting heilt frá ungum árum. Fyri lívlangar veitingar svarar 1,5 árs útgjaldsveiting til umleið 10 prosent av kapitalvirðinum av samansparingini. Fyri at javnseta uppsparing til lívlangar veitingar við lutauppsparingar verður loyvt teimum, ið spara upp til einans lívlangar veitingar, at fáa eina upphædd, ið svarar til 1,5 árs veiting útgoldna í einum við eftirlønaraldur, sum eitt kapitalútgjald. Avgerðin um at spara upp í lívlangar veitingar frá byrjan er tí ikki ávirkað, og viðkomandi fær útgoldið eitt kapitalútgjald, tá eftirlønarútgjald byrjar.

Uppaftur aðrir eftirlønaruppspararar hava bæði eftirlønarsamansparing til lívlanga veiting og eftirlønarsamansparing, ið ikki er greinað. Hesir uppspararar kunnu við útgjald fáa útgoldið 1,5 árs gjald í einum av tí lívlangu veitingini, og 10 prosent í einum av tí eftirlønarsamansparing, ið ikki er sundurgreinað.

Virðið á lívlangu veitingini skal vera í minsta lagi eins stórt sum virðið á tí, sum verður goldið til lutaeftirløn. Trupulleikin er, at ein uppsparing til eina lívlanga veiting ikki hevur nakað neyvt ásett virði, júst tí tað er ein rættur til eina lívlanga veiting. Tað er tó møguligt at gera sundurbýtið so neyvt, at tað er nóg gott at tryggja ætlanini við hesi løgtingslóg. Ásett verður tí, at árliga útgjaldið av lívlongu veitingini skal vera eins stórt og árliga gjaldið frá lutaeftirlønarpartinum, um roknað verður við eini lutaeftirløn yvir 15 ár.

**Til stk. 3.**
Her er talan um, at valið av einum ávísum degi er skeringspunktið fyri eftirlønarveitingini. Tað ber einans til at broyta lutaeftirlønarpartin til lívlanga veiting. TAKS gevur slíkt loyvi eftir skrivligari áheitan frá eftirlønarsamansparara umvegis eftirlønarveitara.

**Til stk. 4.**
Her verður serliga hugsað um tey, ið gjalda heilt nógvan pening til eftirlønarsamansparing gjøgnum eitt langt arbeiðslív og hava ikki gagnnýtt møguleikan í § 2, stk. 4, har persónar kunnu fáa pening útaftur, um søkt verður um tað, tá hámarkið fyri inngjaldi er nátt.

Somuleiðis kann talan vera um fólk, sum í longri tíðarskeið hava inngoldið sjálvboðið eftirlønargjald. Talan kann somuleiðis vera um eina flyting av eftirlønarsamansparing hjá hjúnafelaga/sambúgvandi, ið ger, at eftirlønarsamansparingin gerst stór.

Gjørt verður vart við at talan er um 40% av arbeiðaraløn skattafrítt. Tað vil siga, at hetta svarar til eini 70 prosent av eini arbeiðaraløn áðrenn skatt.

**Til stk. 5.**
Henda áseting merkir, at persónur kann byrja at fáa útgoldið sína eftirløn áðrenn 67 ára aldur, hóast persónurin er arbeiðsførur og ikki avlamin, tí hann hevur sjúku, ið skyldast íbornari ílegusjúku, ið ger at miðallivialdurin hjá honum er niðursettur. Tey, ið hava eina diagnosu við íbornum sjúkuílegum, kunnu liva "væl" og hava eitt virkið arbeiðslív og rinda inn til egna eftirløn. Tað er ætlanin, at har tað er staðfest, at miðallivialdur fyri tí ávísu sjúkuni er lægri enn miðal livialdurin hjá "frískum", at hesi við "sjúkum ílegum" kunnu byrja útgjald fyrr enn 67 ára aldur og í mun til miðalaldur hjá frískum fólki við hægri miðallivialdri.

Fyri tað fyrsta so er ymiskt, nær ella hvussu tann íborna ílegusjúkan ger seg galdandi, tað er eisini sera ymiskt frá fólki til fólk, og slíkt er sera torført at meta um. Fyri tað næsta so er tað ymiskt, hvussu fólk røkja seg sjálvan og sína sjúku, og um fleiri aðrar sjúkur leggjast afturat.

Lógarsmiður hevur tikið atlit til, at tað skal vera ein rímiligheit í øllum hesum kravda inngjaldi. Tað skal geva meining fyri fólk at rinda inn, og tað skal vera rímiligt.

Tað er somuleiðis hugsað um tey, ið gerast álvarsliga sjúk av krabbasjúkum, hjartasjúkum, nýrasjúkum, arbeiðsskaða, ferðsluvanlukku o.s.fr., ið anno 2012 kunnu hava vánalig framtíðarútlit (prognosu), men sum um nøkur ár kunnu lekjast og vera fevnd av miðallivialdrinum, ið er fyri íbúgvar í Føroyum.

Tað er ein ásannan, at tað kunnu vera fleiri fólk, ið hava ein lægri miðallivialdur og sum kortini eru á arbeiðsmarknaðinum uttan at vera óarbeiðsfør. Um tey ætla at gera brúk av at byrja útgjald av eftirløn, skal tað bera til við, at ein umsókn kann sendast til deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, ið viðger og avgreiðir slík mál. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er deild innan sjúkrahúsverkið. Arbeiðsuppgávurnar hjá deildini eru at kanna einstaklingar fyri sjúku ella mein av arbeiðsávum, at meta um arbeiðsførleika, serliga í samband við fyritíðarpensjón, endurbúgving og yrkisráðgeving, at ráðgeva Arbeiðseftirlitinum og Skipasýninum í arbeiðsmedisinskum spurningum.

Fyri persón, har tað grundað á álvarsama sjúku ikki ber til at tekna eina lívrentu, verður upphæddin, sum skuldi verið brúkt til lívrentu, ístaðin brúkt til lutaeftirløn, um ikki onnur avtala er gjørd. Soleiðis verður kravið fyri hesar persónar, at í minsta lagi 90 prosent skal brúkast til lutaeftirløn, meðan 10 prosent av samansparingini kann verða útgoldin sum kapitalútgjald.

**Til stk. 6.**
Eftirlønin kann í seinasta lagi fara í útgjald sama dag, sum eftirlønarsamansparari fær fólkapensjón Hetta stykki er ásett fyri at tryggjað at eftirløn verður útgoldin meðan samanspararin er fólkapensjónistur.

**Til stk. 7.**
At útgjaldið fer gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS inniber, at Almannastovan hevur møguleika fyri at áseta, hvussu nógv skal mótroknast í almannapensjónum.

**Ad. § 10:**

**Til stk. 1.**
Tað er ikki óhugsandi, at eftirlønarsamansparari hevur fleiri eftirlønarskipanir hjá ymiskum eftirlønarveitarum, t.d. hjá tryggingarfelag/feløgum og hjá peningastovni/stovnum. Henda áseting hevur týdning, tá tað skal gerast upp, út frá einum skeringsdegi, hvat endaliga saldan á eftirlønarsamansparingini er. Støða skal takast til, hvussu nógv av eftirlønarupphæddini skal til ávikavist lívlanga veiting, lutaeftirløn og kapitalútgjald sambært § 10, stk. 2.

**Til stk. 2.**
Ásetingin vil fyribyrgja, at útgjaldsupphæddir eru ov lágar og útgjaldstíðarbilið ov langt.
Hesar upphæddir verða prístalsviðgjørdar.

**Ad. § 11:**
Samansparari hevur møguleika fyri at velja lívlanga veiting í øllum samansparingartíðarskeiðnum. Tað merkir, at um samansparari doyr fyri pensjónsaldur, so fer alt samanspart virði til puljuna, t.v.s. at peningaupphæddin verður partur av tí stóru puljuni, har

fleiri hava spart saman. Men hinvegin, vísir tað seg, at um ein samansparari hevur valt lívlanga veiting frá ungum av, so er virðið á samanspardu eftirlønini við útgjaldi væl hægri, í summum førum 25 prosent hægri, meðan útgjaldið fer fram. Tað ber eisini til at velja ein part av samansparingini sum lívlanga veiting og restina sum lutaeftirløn.

Tað eru tey, ið fyrst velja útgjaldsleist tá tey eru komin til pensjónsaldur. Tá er alt inngjaldingartíðarskeiðið at meta sum lutaeftirløn, og merkir tað, at alt uppspart virði kann gjaldast út til njótanartilskilaða, um eftirlønarsamansparari doyr.

Ásetingarnar í hesum lógaruppskoti taka atlit til eftirlønarskatt við inngjaldi, og burtursíggingarrætt og frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni av eftirlønrinngjaldi. Hetta ber í sær, at spurningar um arvarætt og arvaavgjald verða viðgjørdir eftir lóggávuni um arv ávikavist arvaavgjald.

Tað eru ymisk krøv til eftirlønarsáttmálar í tryggingarfelag og peningastovnum viðvíkjandi nærmasta avvarðandi og njótunartilskilaða, ið á donskum verður nevnt sum “begunstiget”.

Hjá tryggingarfeløgum er tað ein treyt, at tað ikki eru innsett onnur í eftirlønarsáttmálan (policen) sum njótunartilskilað, enn tey nærmastu hjá tí tryggjaða/tryggingartakaranum sambært tryggingaravtalulógini. Talan er um hjúnafelaga, fráskildan hjúnafelaga, lívsarvingar, ættleidd børn/fosturbørn ella lívsarvingar hjá ættleiddum/fosturbørnum ella ein navngivnan persón, ið hevur felags bústað við tí tryggjaða, tá viðkomandi verður innsettur, ella lívsarvingarnir hjá tí innsetta ella tann sum tryggingarlóggávan til eina og hvørja tíð loyvir sum innsettur sum njótunartilskilaður.

Í eftirlønarsáttmálum hjá peningastovnum kann ikki verða tikin avgerð um útgjald til onnur enn nærmastu avvarðandi, ið er at skilja sum hjúnafelaga, fráskildur hjúnafelaga, sambúgvandi og lívsarvingar, stjúkbørn, fosturbørn og lívsarvingar teirra.

Tað eru fastar reglur fyri, hvør kann setast inn sum njótunartilskilaður, har tað verður givið frádráttur í skattskyldugu inntøkuni.

Henda eftirlønarlóg loyvir hesum at verða innsett sum njótunartilskilaður:
Nærmasti avvarðandi, hjúnafelagi, ein navngivin persónur, ið hevur felags bústað við tryggingareigaranum (sambúgvandi), fráskildur hjúnafelagi, børn og teirra lívsarvingar, fosturbørn og teirra lívsarvingar og børn hjá sambúgvandi og teirra lívsarvingar. Tað kann somuleiðis verða tikin avgerð um, at fleiri av hesum nevndu kunnu býta eftirlønarsamansparingin.

Sambúgvi, eisini kallað samlivandi, er ein navngivin persónur, sum hevði felags bústað við eftirlønarsamanspararan, tá njótunartilskilaði sambúgvin varð innsettur í eftirlønarsáttmálan. Alsamt størri partur av samlivandi pørum í Føroyum liva saman uttan at vera gingin saman í hjúnalag. Um ein sambúgvi doyr, kann vantandi vígslubræv geva trupulleikar fyri tann, ið eftir situr, um tað ikki í eftirlønarsáttmálanum er ásettur ein njótunartilskilaður sambúgvi. Tá eftirlønarsamansparari doyr, kann tann njótunartilskilaði fáa eftirlønina útgoldna, men hædd verður tikin fyri arvi til lívsarvingar eftir arvalóggávuni, ið ikki verður sett til síðis av hesi eftirlønarlóg.

**Til stk. 2.**
Í samband við útgjald til nærmasta avvarðandi ella njótunartilskilaða verður einki avgjald ella skattur rindaður til landskassan av eftirlønarupphæddini, ið er inngoldin sambært hesi

løgtingslóg. Tað ber somuleiðis til hjá hjúnafelaga ella sambúgva at fáa flutta alla ella part av samanspardu eftirlønina hjá tí deyða til sína egnu eftirlønarsamsparing, ásetingar í hesi lóg skulu fylgjast við útgjaldi. At fáa flutt eftirlønina er ikki galdandi fyri børn hjá tí deyða, einans fyri hjúnafelaga og sambúgva.

Atlit skulu somuleiðis takast fyri galdandi reglum á persóns, familju- og arvarættarliga økinum.

**Til stk. 3 og 4.**
Um eftirlønarsamansparari hvørki hevur nærmasta avvarðandi ella njótunartilskilaðan verður eftirlønarsamsparingin umløgd til eitt kapitalútgjald. Peningaupphæddin verður partur av búnum. TAKS góðtekur einans váttan frá skiftirættinum um andlát og útgjald fyri eftirlønarsamansparing, ið skiftirætturin ásetur.

**Ad. § 12:**

Um persónur ikki frammanundan hevur eina eftirlønarskipan, so skal nýggj stovnast sambært hesi løgtingslóg. Tað skal gerast í seinasta lagi tá persónur byrjar at hava lønarinntøku.

Henda áseting um, at nýtekning ikki skal gerast av galdandi eftirlønum við tilknýttum tryggingum, hevur sum endamál at tryggja eftirlønarsamansparar soleiðis, at teir m.a. ikki skulu vátta núverandi heilsustøðu við nýggjum læknaváttanum. Teknaðar tryggingar kunnu halda áfram óskerdar. Tað er ógreitt fyri lógarsmiðin, um inngjaldið eftir, at skattur er tikin av, er nøktandi fyri tær tryggingar, ið eru teknaðar og rindaðar higartil. Henda áseting hevur einans tilskilað føroyskan eftirlønarveitara, tí tað er ógreitt hvørji viðurskifti eru galdandi fyri útlendska eftirlønaravtalur.

**Til stk. 2.**
40 prosent skulu rindast í eftirlønarskatti av øllum eftirlønarinngjaldi.

**Til stk. 3.**
Fyri eftirlønarinngjøld, ið fylgja ásetingini í hesum uppskoti, verður veittur burtursíggingarrættur ella frádráttarrættur í skattskyldugu inntøkuni, t.v.s. at skattskylduga inntøkan minkar tilsvarandi við eftirlønarinngjaldið. Sami skattligur frádráttur er fyri sjálvboðin inngjøld.

Við burtursíggingarrætti verður meint ein arbeiðsgevaraskipan, har arbeiðsgevari rindar eftirlønargjald hjá løntakara. Tað samlaða eftirlønargjaldið verður beinanvegin skattliga frádrigið í inntøkuni, og tí skal eitt slíkt eftirlønargjald ikki skrivast á sjálvuppgávuna sum egið inngjald og harvið veitast frádráttur fyri. Talan er um at síggja burtur frá eftirlønargjaldinum, tí verður tað nevnt burtursíggingarrættur. Á donskum verður sama fyribrigdi kallað “bortseelsesret”.

Tað eru fleiri arbeiðssáttmálar, har arbeiðsgevari rindar eitt arbeiðsgevaraeftirlønargjald og løntakarin sjálvur rindar eitt eftirlønargjald. Vanligt er, at arbeiðsgevarin rindar bæði arbeiðsgevara- og løntakaraeftirlønargjaldið til eftirlønarveitara í samband við hvørja lønarútrokning og -flyting. At arbeiðsgevarin avgreiðir partin hjá starvsfólkunum (løntakaraeftirlønargjaldið) er fyrisitingarliga lættari fyri bæði arbeiðstakara, løntakara, eftirlønarveitara og TAKS.

**Til stk. 4.**
Tíðarskeiðið fyri inngjaldi til eftirløn við skattligum frádrátti í inntøkuni er frá 1. januar til 31. desember á hvørjum ári. Frádrátturin fylgir inngjaldstíðarskeiðnum.

**Til stk. 5.**
Eitt møguligt frádráttarligt hall kann flytast fram í tíð. Hall kann verða flutt fram til frádrátt eitt seinni inntøkuár í tann mun, rúm ikki er fyri tí í skattskyldugu inntøkuni eitt fyrri ár.

TAKS veitir vegleiðing á heimasíðuni og á Vinnuglugganum um, hvussu arbeiðsgevarar og tey við B-inntøku á mest skynsaman hátt sjálvi rinda til egna eftirlønarskipan, mælt verður til at inngoldið verður til eftirlønarveitara, ið vegna eftirlønarsmanaparara flytir eftirlønarinngjaldið um afturgjalsskipanina hjá TAKS, og á tann hátt rindar skattin. TAKS kann somuleiðis senda inngjaldingarkort til tey, ið ynskja tað.

**Til stk. 6.**
Avmarkað skattskyldugur til Føroyar er persónur, sum ikki hevur bústað í Føroyum, og sum er í Føroyum í styttri tíðarskeið enn 180 dagar. Eftir 180 dagar er persónur fevndur av fullari skattskyldu.

Sum avmarkað skattskyldug verður eingin frádráttur í skattskyldugu inntøkuni givin. Men, tá fólk gerast fult skattskyldug, verður ymiskur skattligur frádráttur givin og eisini eftirlønarfrádráttur í skattskyldugu inntøkuni, samstundis verður eftirlønarskattur goldin av eftirlønarinngjaldi. Men tað er bert galdandi fyri tíðarskeiðið tá avmarkaða skattskyldan heldur uppat og viðkomandi verður fevndur av fullari skattskyldu.

**Til stk. 7.**
Áseting um heimild hjá TAKS, um arbeiðsgevari ikki heldur sínar skyldur í mun til at rinda skatt av eftirlønargjaldi.

**Til stk. 8.**
Áseting um heimild hjá TAKS, um arbeiðsgevari ikki heldur sínar skyldur í mun til at rinda skatt av eftirlønargjaldi.

**Til stk. 9.**
Áseting um, at hvussu eftirløn og eftirlønarskattur skal rindast verður ásett við kunngerð.

**Ad. § 13:**

**Til stk. 1-3.**
Rentur fevna um bæði vanligar rentur á kontu í peningastovni og serligar "samansparingarrentur". Harumframt umfatar lógin eisini rentur av lánsbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum, sølu av tekningarættum, har uppsparda upphæddin er nýtt til partabrøv í virðisbrævagoymslu hjá uppsparara, ella har rentan stavar frá puljuskipanum, har rentan er tengd at avkastinum í tí einstøku puljuni.

Tilskriving av bonus er at skilja sum, at tann samlaða bonusupphæddin, sum er tøk í tryggingarfelagnum, verður býtt ímillum teir einstøku tryggingareigararnar. Bonus í samband við skipan í lívstryggingarfelag ella eftirlønargrunni, har limum er tryggjað ein veiting, og teir taka lut í yvirskotinum hjá felagnum, telur eisini sum samanspart bonus.

Tilskrivaða bonusupphæddin verður nýtt í samsvari við tryggingaravtaluna at keypa trygging fyri, soleiðis, at tær avtalaðu tryggingarveitingarnar verða størri. Í samansparingartíðarskeiðinum er bonus hvørki skatt- ella avgjaldsskyldugt. Rentutilskriving, bonus og vinningur verða útgoldin saman við samanspardu eftirlønini.

**Ad. § 14:**

**Til stk. 1.**
Her er talan um tær eftirlønarskipanir, sum ikki koma undir hesa løgtingslóg. Hesir hava ongar skattligar sersømdir og verða viðgjørdar sum vanlig frí uppsparing. Tað vil siga, skattur, frádrádráttir o.a. er sambært kapitalvinngsskattalógini.

**Til stk. 2.**
Renta og annar ávøkstur av eini slíkari eftirlønarskipan verður skattaður í samband við útgjald av eftirlønini eftir kapitalvinningsskattalógini. Sum renta og ávøkstur er at meta munurin millum samlaðu inngjøldini og útgjaldið. Inngjøldini verða ikki tald við í skattskyldugu inntøkuna.

**Ad. § 15:**
Árliga verða upphæddirnar javnaðar við prístalsvirðinum 1. januar 2013, sum verður sett til 100. Broytingin í upphæddunum verður útroknað hvønn 1. juli og kunngjørd av landsstýrismanninum sum galdandi fyri komandi álmanakkaár.

**Ad. § 16:**

**Til stk. 1.**
Tvingsilsdagsbótin uppá 50.000 krónur er grundað á, at TAKS á hvørjum ári í góðari tíð skal senda sjálvuppgávu/skattauppgerð til øll skattskyldug við upplýsingum um m.a., hvussu nógvan pening eftirlønarveitarar hava fingið í eftirlønargjaldi og saldo o.s.fr. Freistin hjá TAKS at senda slíka fráboðan til øll tey skattskyldugu er sera stutt, tí skattaborgarin skal hava upplýsingarnar í góðari tíð. Freistin hjá skattaborgarum at senda sjálvuppgávuna rættstundis inn aftur til TAKS er 1. mai á hvørjum ári. Kemur slík sjálvuppgáva ov seint inn, verður bót á upp til 5.000 krónur áløgd skattgjaldaranum. Tí er tað rímiligt, at eftirlønarveitarin heldur sína upplýsingarskyldu, og sendir upplýsingarnar rættstundis inn til TAKS, borgaranum til frama.

TAKS hevur ásannað, at ár eftir ár er tað trupult at fáa upplýsingarnar frá summum eftirlønarveitarum til tíðina, og tað hevur verið neyðugt at rykt eftir upplýsingum ferð eftir ferð. Higartil hevur tað ikki verið møguligt at revsa eftirlønarveitarar fyri at lata upplýsingar ov seint inn. Talan er um upplýsingar av øllum tølum fyri allar eftirlønarupphæddir, ið eru fevndar av upplýsingarskyldu, og tað er sera óheppið fyri bæði TAKS og skattgjaldaran, at upplýsingarnar ikki koma rættstundis inn til TAKS. Peningur, ið kemur inn fyri dagbøtur, fer í landskassan.

**Til stk. 2.**
Um eftirlønarveitari ikki heldur sína útgjaldsætlan, verður fyrst send ein ávaring. Verður brotið ikki rættað, kann eftirlønarupphæddin verða flutt til annan eftirlønarveitara at umsita uttan kostnað fyri eftirlønarsamansparararan, t.v.s. at eftirlønarveitari, ið ikki hevur rættað brotið,

kemur at bera allan kostnaðin av at flyta eftirlønarupphæddina umframt missin, ið eftirlønarsamanspararin hevur av brotinum.

**Til stk. 3.**
Áseting um at TAKS kann taka góðkenning frá eftirlønarveitara aftur skal skiljast á tann hátt, at eftirlønarinngjald til ávísan eftirlønarveitara ikki kann gerast við burtursíggingarrætti og frádrátti í skattskyldugu inntøkuni. Øll onnur revsing er áløgd øðrum myndugleikum, og ikki TAKS.

**Ad. § 17:**

**Til stk. 1.**
Persónur, ið er føddur fyri 1. januar 1954, hevur ikki skyldu til at stovna eftirlønarsáttmála og rinda inn til eftirløn. Henda áseting tekur hædd fyri, at hesir persónar møguliga ikki hava so mong ár eftir á arbeiðsmarknaðinum, og vildi tað verið órímiligt at álagt teimum at stovna eftirlønarskipan nú. Inngjaldið vil vera heldur lágt, av tí at kravið er einans 1 prosent í 2014, og hækkar við einum prosenti um árið. Hesir persónar vilja innan fýra ár ella minni náa fólkapensjónsaldurin og ein eftirlønarskipan kann kosta í umsitingarkostnaði óneyðuga nógv fyri hesir persónar. Men, tað er einki, ið forðar hesum persónum at stovna eftirlønarkonto, rinda eftirlønargjald og fylgja ásetingunum í hesi lóg.

Teir persónar, ið eru føddir fyri 1. januar 1954, og hava eina eftirlønarskipan, kunnu halda áfram at rinda til eftirlønarskipan sambært hesi lóg.

Teir persónar, ið eru í einum sáttmálabundum starvi og rinda til eftirløn, halda áfram við somu eftirlønarskipan.

**Til stk. 2.**
Freistin at stovna eftirlønarkontu er sett til 1. januar 2014. Freistin at stovna eftirlønarkontu er fyri tey, ið eru 21 ár og eldri, men fevnir ikki um tey, ið eru fødd áðrenn 1. januar 1954, tey kunnu eftir egnum ynski stovna og rinda til eftirløn. Persónur, ið verður 21 ár eftir 1. januar 2014, skal í seinasta lagi á 21 ára føðingardegi sínum stovna eina eftirlønarkontu um viðkomandi er í løntum starvi. Tað er einki í hesi lóg, ið forðar fyri, at persónur yngri enn 21 ár stovnar eftirlønarkonto og rinda eftirlønargjald. Her verður serliga hugsað um tey, ið eru í starvi og ynskja at rinda til eftirløn. Mest sannlíkt er at starv teirra er fevnt av einum kollektivum starvssáttmála, og skulu tey tá rinda eftirløn.

**Til stk. 3.**
Henda áseting heimilar at flyta inngoldna eftirløn í 2012 sambært rentutryggingarlógini til eftirlønarsamansparing, ið er inngoldin sambært hesi løgtingslóg.

**Til stk. 4.**
Henda áseting um, at nýtekning ikki skal gerast av galdandi eftirlønum við tilknýttum tryggingum, hevur sum endamál at tryggja eftirlønarsamansparar soleiðis, at teir m.a. ikki skulu vátta núverandi heilsustøðu við nýggjum læknaváttanum. Teknaðar tryggingar kunnu halda áfram óskerdar. Tað er ógreitt fyri lógarsmiðin, um inngjaldið eftir at skattur er tikin av, er nøktandi fyri tær tryggingar, ið eru teknaðar og rindaðar higartil.

**Til stk. 5.**
Her er talan um eina skiftisskipan fyri teir persónar, ið higartil hava rindað til danska eftirlønarskipan. Fyri inngjaldið, ið er goldið til danska eftirlønarveitaran, er í Føroyum givin frádráttur í skattskyldugu inntøkuni við burtursíggingarrætti fyri eftirlønarinngjaldið.

Við lógaruppskotinum verður mælt til, at hesir persónur halda fram við síni núverandi skipan við teimum sertreytum at talan er um minst 15 prosent av lønini og at onki verður rinda til kapitalpensjón, men annars er talan um somu treytir sum í dag. Orsøkin til hesar sertreytir er, at talan skal verða um eina munandi eftirlønarskipan, sum kann tryggja samansparara eitt nøktandi inntøkugrundarlag sum pensjónistur.

Tey kunnu framhaldandi fáa burtursíggingarrætt og frádráttarrætt í skattskylugu inntøkuni fyri inngjaldið til eina verandi skipan, men tey skulu, eins og øll onnur í Føroyum rinda 40 prosent í eftirlønarskatti av inngjaldinum til eftirlønarskipanina í Danmark.

Tað krevst loyvi at kunna rinda til ta donsku eftirlønarskipanina. Loyvi fæst við at søkja TAKS. Tað ber til hjá fakfeløgum at søkja TAKS fyri bólk av teirra limum, so sleppast kann undan, at tað er hvør einstakur, ið søkir.

Útgjaldsleisturin verður ikki eins og ásett í hesi lóg, men útgjaldsleisturin verður hann, ið er ásettur sambært eftirlønarsáttmálanum.

**Ad. § 18:**

Áseting um gildiskomu.

**Kap. 5. Fylgiskjøl**

- Yvirlit yvir hoyringspartar
- Yvirlit yvir broytingar í mun til uppskotið sum fór í hoyring 28. Mars 2012.

Fíggjarmálaráðið, tann 18. januar 2013

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason